LM-066/2025

# Løgmansskrivstovan

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 11.12.2025 |
| Mál nr.: | 25/26836 |
| Málsviðgjørt: | Løgmansskrivstovan |
| Ummælistíð: | 31.10 – 14.11.2025 |
| Eftirkannað: | 01.12.2025 |

**Uppskot til**

## Løgtingslóg
## um
## fyrireiking, prosjektering og útboð av Suðuroyartunlinum við tilhoyrandi tunnilskervum og vegakervum

**§ 1.** P/F Suðuroyartunnilin er ábyrgdarhavandi byggiharri fyri Suðuroyartunnilin við tilhoyrandi tunnilskervum og vegakervum.

**§ 2.** Partabrøv felagsins eru ogn landsins.
*Stk. 2.* Tað er ikki loyvt felagnum at luttaka í fusjón, klovningi ella aðrari yvirtøku av virki, sum hevur við sær, at onnur enn landið gerast eigarar av partabrøvum í felagnum.
*Stk. 3.* Landsstýrisfólkið skal góðkenna starvsskipan fyri nevnd og stjórn felagsins, eins og landsstýrisfólkið skal góðkenna samsýningina til nevnd og stjórn felagsins.

**§ 3.** P/F Suðuroyartunnilin fyrireikar, prosjekterar og letur í útboð hesar verkætlanir:

1) Farleið frá verandi vegi í Traðardali, eysturum Sandsvatn við vegum og møguligum tunli undir Traðarhamri, til undirsjóvartunnilin í Djúpadali, við íbinding í verandi vegir til Skálavíkar og Skarvanes,
2) undirsjóvartunnil við koyribreyt suður og norður í sama bergholi frá Djúpadali til Sandvíkar, við atknýttum atkomutunli frá Suðuroyartunlinum til Skúvoyar,
3) veg millum undirsjóvartunnilin í Sandvík og nýggja Sandvíkartunnilin við íbinding í verandi veg í Sandvík,
4) tunnil úr Sandvík til Hvalbiar, og
5) veg millum nýggja Sandvíkartunnilin og landsvegin frá Hvalbiartunlinum.

*Stk. 2.* P/F Suðuroyartunnilin kann ikki taka av tilboðum sbrt. stk. 1 fyrr enn

heimild er fingin til tess við serstakari løgtingslóg.

**§ 4.** Landsverk skal undir ábyrgd mótvegis landsstýrisfólkinum góðkenna verkætlanirnar, sum eru nevndar í § 3, áðrenn arbeiðini verða boðin út, og tá arbeiðini eru liðug. Landsverk skipar í hesum sambandi fyri eftirliti við, at verkætlanirnar verða framdar samsvarandi góðkendu ætlanunum.

**§ 5.** Tá ið teir tunlar og vegir, sum nevndir eru í § 3, stk. 1, nr. 1 og 3–5 eru lidnir, verða teir avhendaðir landinum fyri útveganarkostnað og lagdir afturat vanliga landsvegakervinum.
*Stk. 2.* Frá og við árinum, tá Suðuroyartunnilin letur upp fyri ferðslu, hevur felagið við grundarlagi í útveganarkostnaðinum av undirsjóvartunlinum rætt til skattligar avskrivingar samsvarandi reglunum um vinnuligar bygningar.

**§ 6.** Suðuroyartunnilin, sbr. § 3, stk. 1, nr. 2, verður framhaldandi ogn hjá P/F Suðuroyartunlinum og partafelagið stendur fyri rakstri og viðlíkahaldi av tunlinum. Partafelagnum er heimilað at áseta og krevja inn gjald fyri at koyra ígjøgnum tunnilin.
*Stk. 2.* Felagið hevur rætt til uttan viðurlag at fáa upplýsingar frá Akstovuni um skrásettar eigarar og brúkarar av akførum til tess at ansa eftir gjaldstaðnum.
*Stk. 3.* Skelting og avmerking í Suðuroyartunlinum skal gerast samsvarandi galdandi kunngerð og ferðsluavmerkingum. Øll skelting og vegavmerking skal góðkennast av ferðslumyndugleikanum og landsvegamyndugleikanum.
*Stk. 4.* Suðuroyartunnilin er ikki partur av landsveganetinum sbrt. løgtingslóg um landsvegir.
*Stk. 5.* Í mun til loyvi sum krevjast frá ymsum myndugleikum o.a. gongur arbeiðið við Suðuroyartunlinum við tilhoyrandi tunnilskervum og vegakervum eftir somu reglum sum landsvegagerð.
*Stk. 6.* Felagið hevur rætt til uttan viðurlag at hava Suðuroyartunnilin bundnan í landsveganetið.
*Stk. 7.* Við íbinding í landsvegin, skal felagið gera og rinda útreiðslurnar fyri møguliga umlegging av landsveganetinum. Felagið skal rinda fyri íbindingar uttan mun til, um tað er rundkoyring ella onnur íbinding. Um so er, at íbindingin kemur inn í landsveg, verður íbindingin partur av landsvegnum, og ognarrætturin fellur til landsstýrið.

**§ 7.** Landsstýrisfólkið kann ognartaka neyðugt lendi ella tilfar fyri at fremja verkætlanirnar, sbr. § 3, um so er, at semja ikki verður fingin við tey, sum hava rættindi yvir lendinum ella tilfarinum.
*Stk. 2.* Ognartøka verður gjørd móti fullum endurgjaldi.
*Stk. 3.* Ognartøka verður framd sbrt. lov om forpligtelse til jords afgivelse til offentlige veje, havne og landingssteder samt til offentlige skoler på Færøerne.
*Stk. 4.* Landsstýrisfólkið kann avhenda tað ognartikna til P/F Suðuroyartunnilin fyri útveganarkostnað.

**§ 8.** P/F Suðuroyartunnilin hevur skyldu til at fáa til vegar eina frágreiðing um avleiðingar fyri náttúru og umhvørvi, t.e. umhvørvisárinsmeting, av samlaðu verkætlanini. Áðrenn farið verður undir verkætlanina skulu úrslit av umhvørvisárinsmetingini vera góðkend av Umhvørvisstovuni.
*Stk. 2.* Viðkomandi almenningur, myndugleikar og felagsskapir skulu hoyrast við 6 viku freist áðrenn umhvørvisárinsmetingin verður góðkend.
*Stk. 3.* Góðkenning sbrt. § 8, stk. 1 kann kærast av teimum, sum eru partur av málinum við 4 viku freist til landsstýrisfólkið við umhvørvismálum.
*Stk. 4.* P/F Suðuroyartunnilin skal endurrinda útreiðslur, sum Umhvørvisstovan hevur í sambandi við viðgerð av málum um umhvørvismeting

og umhvørvisgóðkenning sbrt. § 8 stk. 1 og stk. 3. Gjaldið verður roknað við støði í tímanýtslu og tímakostnaði hjá Umhvørvisstovuni.
*Stk. 5.* Undirsjóvartunnil sbrt. § 3, stk. 1, nr. 2 krevur loyvi sbrt. § 28 í løgtingslóg um umhvørvisvernd.

**§ 9.** Løgtingslóg um innlit í fyrisitingina er galdandi fyri P/F Suðuroyartunnilin.

**§ 10.** Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
*Stk 2.* § 9 er bert galdandi fyri skjøl, sum P/F Suðuroyartunnilin hevur gjørt, ella sum eru komin felagnum í hendi, eftir at løgtingslógin fekk gildi.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Politisk semja er um at halda fram við verkætlanini Suðuroyartunnil við tilhoyrandi tunnils- og vegakervum. Ein politiskur fylgibólkur við umboðum úr øllum flokkum á Løgtingi hevur fylgt allari tilgongdini, síðan lógaruppskotið um at fyrireika Suðuroyartunnil byrjaði.

Semja er í politiska fylgibólkinum um at halda fast í linjuføringini, sum P/F Suðuroyartunnilin upprunaliga hevur mælt til millum Sandvík og Djúpadal, og at ein atkomutunnil skal gerast til Skúvoyar.

Harumframt leggur løgmaður dent á, at tíðin er búgvin til, at Løgtingið tekur støðu til tvinni viðurskifti:

1. Skal Suðuroyartunnil við tilhoyrandi tunnils- og vegakervum fyrireikast, prosjekterast og bjóðast út?
2. Skal tað framvegis vera P/F Suðuroyartunnil, sum hevur royndir frá væl eydnaðu verkætlanunum við Eysturoyar- og Sandoyartunlunum, sum er byggiharri og skal standa fyri fyrireikingararbeiðinum, prosjekteringini og útboðnum av verkætlanini?

Lógaruppskotið snýr seg um at fyrireika, prosjektera og bjóða út ein Suðuroyartunnil við tilhoyrandi tunnils- og vegakervum.

Talan er um eina verkætlan í tveimum pørtum og skal harvið samtykkjast í Løgtinginum tvær ferðir.

Fyrri parturin snýr seg um at fyrireika, prosjektera og bjóða út, og harvið koma fram til ein neyvari kostnað. Tað er hetta lógaruppskotið, ið nú er lagt fyri Løgtingið.

Tá fyrri partur er liðugur, skal Løgtingið aftur taka støðu til nýggju upplýsingarnar, og nýtt uppskot um at fremja verkætlanina og byggja undirsjóvartunnil verður lagt fyri Løgtingið.

Seinastu hálvu øldina hava skiftandi landsstýri og løgting gjørt munandi íløgur í føroyska samferðslukervið soleiðis, at føroyingar kunna búgva, virka, arbeiða og ferðast í øllum landinum. Við Sandoyartunlinum hava 91% av føroyingum fingið henda møguleika við føstum vegasambandi, og við einum møguligum Suðuroyartunli verða 99% av fólkinum í Føroyum knýtt saman við føstum vegasambandi.

Suðuroyggin er tann einasta stóra oyggin, sum eftir er, ið ikki hevur fast samband, og ferðasambandið er til tíðir heldur óstøðugt. Harumframt vísa øll tøl, at Suðuroyggin er í eini serstøðu, tá tað snýr seg um haldføristrupulleikar, sum bara gerast verri, um onki verður gjørt.

Hóast fólkavøksturin hevur verið stórur samanlagt í Føroyum seinastu 10 árini, er fólkatalið minkað í Suðuroynni. Minkingin er grundað á fólkafráflyting og lægri burðartal. Hetta merkir, at tey eldru eru ein lutfalsliga størri partur av fólkinum, meðan tey í arbeiðsførum aldri og børnini eru lutfalsliga færri í tali.

Samstundis eru fleiri avbjóðingar viðvíkjandi arbeiðsmarknaðinum í Suðuroynni, samanborið við restina av landinum. Miðalinntøkan er lægst í Suðuroynni, og ein minni partur av íbúgvunum eru í starvi ella eru starvssøkjandi. Harumframt er arbeiðsloysið hægri enn í restini av landinum, og serliga er talið av langtíðararbeiðsleysum lutfalsliga hægri í Suðuroynni.

Fyri at venda gongdini, hevur Løgtingið gjørt av at arbeiða við at knýta Suðuroynna í meginøkið. Í fíggjarlógini fyri 2022 játtaði Løgtingið 4 mió. kr. til partapening at seta í P/F Suðuroyartunnilin sum tá bleiv stovnað, tí farast skuldi undir at fyrireika ein Suðuroyartunnil, og í fíggjarlógunum 2023 og 2024 vórðu játtaðar samanlagt 20 mió. kr. til neyðugar forkanningar, sum P/F Suðuroyartunnilin hevur staðið fyri.

Forkanningararbeiðið fevnir um at kanna linjuføringar, at gera neyðugar jarðfrøðiligar kanningar, trygdarkanningar, kostnaðarmeting, og P/F Suðuroyartunnilin hevur fingið heimild til at fáa alt tilfar, sum er framleitt av Landsverki.

Grundarlagið undir arbeiðinum at fyrireika Suðuroyartunnilin hevur verið at finna eina loysn, sum letur seg gjøgnumføra bæði í mun til trygd, jarðfrøði og kostnað.

Í upprunaliga forprosjektinum, sum P/F Suðuroyartunnilin og ráðgevarar gjørdu, varð mælt til eina loysn við einum røri við ferðslu báðar vegir í sama bergholi.

Í sambandi við fyrireikingararbeiðið av einum møguligum Suðuroyartunli hevur løgmaður lagt dent á at hava allar politiskar flokkar, sum eru umboðaðir í Løgtinginum, við í tilgongdini, tí talan er um størstu íløgu í samferðslukervið í føroyskari søgu, bæði viðvíkjandi vavi og fígging, og tí ynskiligt er at fáa breiða politiska semju um málið.

Í november 2024 varð politisk semja undirskrivað av umboðum fyri allar flokkar, og uppskot um Suðuroyartunnil við tilhoyrandi tunnils- og vegakervum sent í almenna hoyring. Semjan liggur við sum fylgiskjal 19.

Í februar 2025 varð uppskotið lagt fyri Løgtingið (løgtingsmál 72/2024) og fekk umfatandi viðgerð í Fíggjarnevndini.

Ein áhugabólkur við fólki við royndum úr byggivinnuni og sum hava verið við at gera tunlar í Føroyum, legði fram eitt alternativt uppskot til linjuføring millum Sandvík og norðan fyri Múlan í Traðardali, har borað varð úr Skúvoy.

Tunnilsáhugabólkurin førdi fram, at hóast undirsjóvartunnilin við hesi linjuføring var longri enn uppskotið, sum var lagt fyri Løgtingið, var møguligt at gera tunnilin skjótari lidnan, og við at spara sjóvegis farleiðina tilsvarandi fyrr, var mest sum allur meirkostnaðurin vunnin inn aftur.

P/F Suðuroyartunnilin hevði, áðrenn tilmælið um linjuføring varð gjørt, kannað møguleikarnar at bora úr Skúvoy. Mett varð, at váðin var ov stórur, og sera stórar upphæddir skuldu brúkast fyri at tryggja veitingar av útgerð, tilfari o.a., sum skal til fyri at bora undirsjóvartunnil úr Skúvoy.

Harumframt vóru ókendar avbjóðingar við at hava byggipláss í Skúvoy í mun til ymsa umhvørvisløggávu. Tí hevði Skúvoy verið frávalt upprunaliga, tá linjuføring fyri undirsjóvartunnilin skuldi veljast.

Eftir áheitan frá Løgmansskrivstovuni gjørdi P/F Suðuroyartunnilin eitt notat við meting av kostnaði og ávirkan á byggitíð, um borast skuldi úr Skúvoy og alternativa linjuføringin skuldi veljast (fylgiskjal 21). Tunnilsfelagið metti kostnaðin av at bora úr Skúvoy at vera væl hægri enn tunnilsáhugabólkurin vildi vera við, og at sparingin í byggitíð var væl minni, enn tunnilsáhugabólkurin førdi fram. Ein týðandi fortreyt fyri serliga metingini, at sparingin í byggitíð var so lítil, er, at tað ikki verður loyvt at gera arbeiðshavn í Skúvoy og gera klárt til byggipláss fyrr enn eftir, at verkætlanin var samtykt.

Løgmaður valdi at seta ein skjóttarbeiðandi serfrøðingabólk við fimm persónum at gera eina uttanveltaða meting av uppskotinum hjá tunnilsáhugabólkinum og metingina hjá Tunnilsfelagnum. Arbeiðssetningurin var hesin:

> *"Arbeiðsbólkurin skal gera viðmerkingar til uppritið frá p/f Suðuroyartunlinum um fyritreytir fyri og avleiðingar av at bora undirsjóvartunnil úr Skúvoynni. Sum part av arbeiðinum skal arbeiðsbólkurin eisini geva tunnilsbólkinum(áhugabólkinum) møguleika at føra síni sjónarmið fram."*

Skriv til arbeiðsbólkin um arbeiðssetningin er hjálagt sum fylgiskjal 22.

Arbeiðsbólkurin gav tunnilsáhugabólkinum og P/F Suðuroyartunlinum møguleika at føra síni sjónarmið fram. Tað gjørdi P/F Suðuroyartunnilin á fundi við arbeiðsbólkin, men sambært arbeiðsbólkinum ynskti tunnilsáhugabólkurin ikki at taka av hesum møguleika, tí teir góðtóku ikki samansetingina av serfrøðingum í arbeiðsbólkinum. Serfrøðingabólkurin hevði tí einans notatið hjá P/F Suðuroyartunlinum og alment tilfar frá tunnilsáhugabólkinum at meta um, t.e. hoyringarskriv, sum tunnilsáhugabólkurin hevði sent Løgmansskrivstovuni og Fíggjarnevnd løgtingsins og tíðindaskriv, sum eisini vóru at finna sum uppsløg á sosialum miðlum. Harumframt var serfrøðingabólkurin úti í Skúvoy og hugdi eftir umstøðunum har.

Niðurstøðan hjá serfrøðingabólkinum (fylgiskjal 24) var, at tað ber til at bora úr Skúvoy, og um byrjað varð at fyrireika byggipláss og arbeiðshavn frammanundan, kundi sparast nógv í byggitíð. Hetta er galdandi fyri báðar linjuføringar. Eisini sá arbeiðsbólkurin fyrimunir, tá tað kemur til trygd í arbeiðinum, um tunnilin eisini varð boraður úr Skúvoy.

Ætlanin var, at serfrøðingabólkurin eisini skuldi meta um møguleikarnir at fáa neyðug loyvi til allar fyrireikingar og arbeiði, sum gjørdu tað møguligt at bora úr Skúvoy, undir hesum at koyra grót á sjógv og gera fyribils arbeiðshavn. Umhvørvisstovan er avvarðandi myndugleiki innan náttúruvernd og skal góðkenna umhvørvisárinsmetingarnar, sum skulu gerast, og kundi tí ikki taka støðu til ítøkilig mál, men bert viðmerkja vegleiðandi og generelt um evni innan atlit at og árin á náttúru og umhvørvi. Skrivið frá Umhvørvisstovuni er hjálagt sum fylgiskjal 23.

Eftir tvær løgtingsviðgerðir við drúgvum orðaskifti og umfatandi nevndarviðgerð, varð løgtingsmálið atkvøtt aftur í nevnd tann 19. mai 2025.

Orsøkin var m.a., at tingfólk úr øllum flokkum vóru ivasom í mun til tilmæltu linjuføring millum Sandvík og Djúpadal og ynsktu at fáa linjuføringina millum Sandvík og norðan fyri Múlan í Traðardali kannaða nærri.

Uppskotið fall burtur á ólavsøku.

Løgmaður valdi síðani at taka málið um kanning av linjuføringini millum Sandvík og norðan fyri Múlan og samanberingina millum linjuføringarnar upp í politiska fylgibólkinum.

Á fundi í Tinganesi 10. juni 2025 við luttøku av forfólkunum og politiska fylgibólkinum var semja um fylgjandi viðurskifti:

- Politiski fylgibólkurin verður víðkaður til eisini at fevna um forfólkini í øllum flokkum á Løgtingi, og kunningarfundir verða leypandi fyri tingfólkum.
- Tað verður framhaldandi P/F Suðuroyartunnilin, sum skal standa fyri fyrireikingararbeiðinum, undir hesum at framleiða tilfar til politiska støðutakan.
- Framleiðast skal eitt avgerðarnotat, sum fevnir um lýsing og samanbering av tveimum farleiðum, sum knýta Suðuroynna upp í meginøkið. Tá tilfarið er framleitt, verður politisk støða tikin til farleið.
- Notatið skal fevna um lýsing av undirsjóvartunlum, vegum og tunlum á landi fyri báðar farleiðir.

Somuleiðis var semja um, at farleið 1 fevnir um undirsjóvartunnil millum Djúpadal og Sandvík við vegaføring gjøgnum Sands bygd til Sandoyartunnilin og atkomutunnil til Skúvoyar og farleið 2 fevnir um undirsjóvartunnil millum Traðardal og Sandvík við eini íbínding til tunnil til Skúvoyar.

Fyri báðar farleiðir eru tey somu tunnils- og vegakervi í Suðuroy atknýtt, ið eru lýst í forprosjekti, sum LBF hevur framleitt fyri P/F Suðuroyartunnilin.

Semja var um, at íbinding í Skúvoy skal vera partur av útboðnum av Suðuroyartunlinum. Í farleið 2 er ein fortreyt, at borað verður úr Skúvoy. Verður farleið 1 vald, kann Skúvoy bindast í Suðuroyartunnilin við at bora upp í Skúvoy ella niður úr Skúvoy.

Semja var um, at lýsingin skal umfata trygd, kostnað, tíðarætlan og umhvørvisatlit.

Niðurstøðuskjalið liggur við sum fylgiskjal 25, har skjalið kann lesast í síni heild.

Á fundi 4. september 2025 var fundur í politiska fylgibólkinum, har limirnir fingu ávegis kunning um kanningararbeiðið – undir hesum eisini kunning um, hvat skuldi metast av 3. pørtum og hvørjir hesir 3. partarnir eru.

Út frá semjuni frá 10. juni 2025, hevur P/F Suðuroyartunnilin fingið nærri greiningar gjørdar hjá ráðgevunum, og er úrslitið fýra frágreiðingar, sum viðgera ymisk viðurskifti, sum hava týdning til samanbering av farleið 1 og farleið 2.

Tveir uttanhýsis partar hava gjørt óhefta 3. partsmeting av tilfarinum, sum eru tvær aðrar frágreiðingar. Í ávísan mun eru viðmerkingar frá 3. pørtum tiknar til eftirtektar, og skjølini broytt tilsvarandi. Í øðrum førum verða viðmerkingarnar tiknar við til víðari fyrireikingararbeiðið og prosjekteringina. Úr hesum tilfari er avgerðarnotat gjørt, har mest týðandi úrslit eru sett saman.

3. partsmetingarnar fevna eisini um at meta um, um avgerðarnotatið er rætt í mun til frágreiðingarnar. Avgerðarnotatið og tey seks skjølini eru fylgiskjøl til hetta lógaruppskotið.

Avgerðarnotatið vísir, at kostnaðurin hækkar við umleið einari hálvari mia. kr, um borað verður úr Skúvoy í staðin fyri upp í Skúvoy, men at tá verður byggitíðin umleið hálvt annað ár styttri, sum gevur møguleika at spara sjóvegis farleiðina tilsvarandi fyrr. Eisini verða stuffarnir styttri, tá borað verður úr Skúvoy, sum kann vera ein fyrimunur fyri trygdina í byggitíðini.

Í triðja lagi vísa avgerðarnotatið og viðmerkingar frá 3. partsmetingum, at váðar fyri seinkingum og fyri hækkaðum kostnaði eru ymiskir fyri ymsu loysnirnar. Her eru partarnir, sum hava gjørt 3. partsmeting, ikki samdir í øllum.

- Bæði Nordmelan og Cowi meta, at tíðarætlanin er optimistisk, men sagt verður eisini, at tíðarætlanin ikki er órealistisk.
- Báðir partar meta, at við farleið 2 er størri vandi fyri seinkingum í mun til mettu byggitíðina, enn við farleið 1.
- Nordmelan heldur, at møguleikar eru fyri at bora úr Skúvoy fyri ein lægri kostnað enn metingin hjá P/F Suðuroyartunlinum, men tá eru nakrar fortreytir, sum skulu uppfyllast. Cowi vísir hinvegin á, at tað má væntast at vera dýrari at bora niður úr Skúvoy enn at bora upp í Skúvoy.
- Nordmelan ivast, um møguligt er at koma í gongd við at bora úr Skúvoy so tíðliga sum ætlað, sum er ein fortreyt fyri, at tíðarætlanin heldur fyri loysnirnar, har borað verður úr Skúvoy.

**Talva 1: Farleiðir, kostnaðarmetingar og byggitíð**

| | **Farleið 1: Djúpadalir – Sandvík** | | **Farleið 2: Múlin – Sandvík** | |
|---|---|---|---|---|
| | A: Bora upp í Skúvoy | B: Bora úr Skúvoy | A: Bora upp í Skúvoy* | B: Bora úr Skúvoy |
| Kostnaðarmeting, mió. kr. | 4.875 | 5.457 | 5.369 | 5.945 |
| Byggitíð, ár | 10,1 | 8,7 | 11,0 | 9,3 |

Kelda: Avgerðarnotat, P/F Suðuroyartunnilin (Fylgiskjal 27)
*Viðmerking til loysn 2A: Fyri farleið 2, er tunnilin so langur, at boring úr Skúvoy verður mett at vera ein fortreyt fyri at fremja verkætlanina, og tí er loysn 2A ógvuliga ivasom. Hetta framgongur eisini av niðurstøðuskjalinum (fylgiskjal 25). Loysnin er kortini tikin við í útrokningum og uppsetingini her, fyri betur at vísa, hvussu stórur partur av muni í kostnaði og byggitíð kemur av longd á undirsjóvartunlinum og hvussu stórur partur kemur av at bora úr Skúvoy.

Eitt neyvari boð upp á kostnað og byggitíð er í síðsta enda treytað av, hvør linjuføring verður vald at fara víðari við, og síðani teimum tilboðum, sum koma inn upp á at gera tunnilin og avleiddu verkætlanirnar.

Fyri byggitíðina hevur longdin á tunlinum ávirkan á vandan fyri tey, sum arbeiða í tunlinum. Longri tunnil merkir størri váði. Serliga er tað longdin frá tunnilsmunna til har arbeitt verður, sum hevur týdning. Um íbinding í Skúvoy er partur av verkætlanini, ávirkar skipanin av arbeiðinum longdina frá tunnilsmunna til staðið, har arbeitt verður. Boring úr Skúvoy kann gera váðan minni, men tá borað er ígjøgnum til Skúvoyar, ger tað ikki mun, um borað er til Skúvoyar ella úr Skúvoy.

P/F Suðuroyartunnilin hevur fleiri ferðir víst á verkætlanarváða sum eitt týðandi atlit, tá verkætlanin skal leggjast til rættis. Ein mynd, sum tunnilsfelagið hevur havt við í framløgu fyri politiska fylgibólkinum og Fíggjarnevndini (finst í nevndarskjali E til løgtingsmál 72/2024) vísir tað væl.



Mynd: Longdin á undirsjóvartunlum sum eru bygdir í Noregi, Íslandi og Føroyum síðani 1983. Myndin vísir eisini, hvussu langur Vágatunnilin hevði verið, um hann varð longdur til Sandavágs, og longdin á ætlaða Suðuroyartunlinum er víst við linjuføring 1A og 2B.

Metingin hjá Norconsult er, at tá tunnilin er liðugur og letur upp fyri ferðslu, er lítil munur á trygdini í tunlinum, óansæð hvør linjuføring verður vald, og at íbinding í Skúvoy heldur ikki broytir hetta, m.a. tí sera lítil ferðsla verður til Skúvoyar. Eitt lítið sindur longri tunnil ger ikki stóran mun fyri vandan fyri óhappum í lidna tunlinum. Tó merkir ein longri tunnil, at tá óhapp henda, er longri vegur út úr tunlinum. Um eldur er í, merkir longri strekki at koyra eisini longri tíð inni í roykfyltum tunli.

Hvussu stórur vandin er fyri, at eldur kemur í bilar í tunlinum, verður serliga ávirkað av longd og halli á brekkunum, sum eru í tunlinum. Tað er serliga, um hallið verður meira enn 5%, at vandin fyri eldi í bilum økist, og tí er størsta hall 5%. Í uppskotunum sum eru lýst til avgerðarnotatið er lítil munur á teimum báðum linjuføringunum: Í syðra enda av undirsjóvartunlinum er longdin á brekkuni og hallið tað sama í báðum linjuføringum, góðar 2 km við 5% halli. Í norðara enda er hallið 5% og nakað størri í linjuføring 1 enn í linjuføring 2 har hallið er 3%, men hinvegin er brekkan 3,5 km í linjuføring 2, sum er nakað longri enn í linjuføring 1, har brekkan er góðar 2 km.

Tunnilin frá høvuðstunlinum til Skúvoyar skal eftir ætlan hava eitt hall á 10%, sum er væl meira enn tey 5%, sum er markið fyri, nær vandin fyri eldi í bilum serliga fer at økjast. Deildarleiðarin fyri trygd hjá Norconsult hevur viðmerkt tunnilin til Skúvoyar við serligum atliti til trygd í fylgiskjali 34 soleiðis:

> *"Denne tunnelen er ikke tenkt å ha noen sikkerhetsfunksjon for hovedtunnelen, og om tunnelen til Skuvøy bygges eller ikke vil ikke endre på sikkerhetskonceptet som er planlagt i hovedtunnelen.*

*Brann- og ulykkesstatistikk i Norge tilsier at stigningen på 10% vil medføre at det er en forhøyet fare for brann i denne tunnelen. Trafikken er imidlertid så lav at sannsynligheten for brann også blir lav. Sikkerhetstiltak som brukes i hovedtunnelen (f.eks. AID og røykventilasjon) vil være aktuelt også i denne tunnelen, men det er ikke konkludert nå i forprosjektet om det er behov for sikkert rom her."*

Avtala er gjørd við viðkomandi fakfólk um at gera umhvørvisárinsmetingar fyri tey øki, sum verða ávirkað av arbeiðinum, um farið verður undir at gera ein Suðuroyartunnil. Samskift hevur verið við Umhvørvisstovuna hesum viðvíkjandi.

Á fundi í Tinganesi tann 20. oktober 2025 løgdu umboð fyri P/F Suðuroyartunnilin fram lýsing av undirsjóvartunlum, vegum og tunlum á landi fyri báðar farleiðir, og tingfólk fingu handað avgerðarnotatið, sum er fylgiskjal 27.

Umboð fyri Norconsult – deildarleiðarin fyri trygd og verkætlanarleiðarin – vóru við á fundinum, og høvdu løgtingsfólk møguleika at seta teimum spurningar.

Á fundinum legði Landsverk eisini fram nýggja kostnað-nyttu greining, sum stovnurin hevur gjørt fyri Løgmansskrivstovuna. Kostnað-nyttu greiningin, sum er fylgiskjal 36, brúkti dagførdar prísir og prísir frá ítøkiligari kostnaðarmeting av at bora úr Skúvoy. Tað eydnaðist ikki at fáa dagførda meting frá SSL um kostnaðin av sjóvegis farleið, men hetta eigur ikki at broyta, hvussu farleiðirnar standa í innanhýsis samanbering. Endamálið er at samanbera tær báðar farleiðirnar við dagførdum kostnaði, og at fáa svar uppá, um tað í mun til kostnað-nyttu loysir seg at bora úr Skúvoy.

Kostnað-nyttu greiningin broytir ikki raðfestingina á teimum fýra loysnunum, men munurin minkar nakað. Ein partur av eyka kostnaðinum fyri at bora úr Skúvoy verður vunnin inn aftur í spardari byggitíð. Og ein partur av eyka kostnaðinum fyri at velja longru farleið 2, verður vunnin aftur við spardari ferðatíð fyri brúkarar, tá tunnilin verður tikin í nýtslu. Tað, sum verður vunnið inn aftur er í báðum førum ein lítil helvt.

Eftir fundin fingu tingfólk avgerðarnotatið við fylgiskjølum umvegis teldupost. Fjølmiðlar, sum bóðu um tað, fingu innlit í tilfarið sama dag.

Allir flokkar í Løgtinginum hava nú svarað, og tað er greitt, at semja er um eina linjuføring og ein atkomutunnil til Skúvoyar. Henda linjuføringin fer úr Djúpadali til Sandvíkar, men við atkomutunli upp til Skúvoyar.

Uppskot til løgtingslóg um fyrireiking, prosjektering og útboð av Suðuroyartunlinum við tilhoyrandi tunnilskervum og vegakervum fór til ummælis 31. oktober 2025. Meðan lógaruppskotið var til ummælis, var eisini umrøða av uppskotinum í almenna rúminum. Ynski kom frá bygdaráðnum og politisku økisfeløgunum á Sandi um, at ferðsla frá Suðuroyartunlinum til Sandoyartunnilin ikki skal ganga gjøgnum bygdina.

Á fundi í politiska fylgibólkinum 12. november 2025 var semja um at gera broyting í vegaføringini á Sandi, soleiðis at ferðslan ikki skal ganga ígjøgnum bygdina, og uppskot er um veg eysturum Sandsvatn við tunli undir Traðarhamri. Politiski fylgibólkurin ynskti eisini, at Løgmansskrivstovan og Tunnilsfelagið høvdu fund við Sands bygdaráð og við

tunnilsáhugabólkin, áðrenn uppskotið varð lagt fyri Løgtingið. Fundur var við tunnilsáhugabólkin 18. november og við Sands bygdaráð 19. november 2025.

Inniverandi uppskot fevnir um samlaðu verkætlanina, og fevnir uppskotið um heimild til at fyrireika, prosjektera og bjóða út Suðuroyartunnil við tilhoyrandi tunnilskervum og vegakervum.

Uppskotið gevur ikki heimild til at fremja verkætlanina.

Forkanningararbeiðið, sum Løgtingið við játtan á fíggjarlógunum fyri 2023 og 2024 hevur samtykt, at P/F Suðuroyartunnilin skuldi gera, er komið væl ávegis. Givið er tó, at fyrireikingararbeiðið heldur fram, samstundis sum farið verður undir at detailprosjektera verkætlanina, so at verkætlanin kann bjóðast út.

### 1.2. Galdandi lóggáva

P/F Suðuroyartunnilin varð stovnað við 4 mió. kr. í partapeningini, sum varð játtaður á løgtingsfíggjarlógini fyri 2022 við tí endamáli at gera undirsjóvartunnil millum Suðuroy og Sandoy.

Løgtingið hevur harafturat játtað 10 mió. kr. á fíggjarlógini fyri 2023 og aðrar 10 mió. kr. í 2024 til forkanningar av einum møguligum Suðuroyartunli. Higartil hevur P/F Suðuroyartunnilin arbeitt við at fyrireika Suðuroyartunnilin sambært heimildini á fíggjarlógini. Tað finst ongin serlóggáva, sum skipar virksemið hjá felagnum ella ásetir, hvørjar heimildir felagið hevur í mun til Suðuroyartunnilsverkætlanina.

Til samanberingar kann nevnast, at P/F Eystur- og Sandoyartunnil varð stovnað við heimild í løgtingslóg um at stovna partafelag og at byggja og reka undirsjóvartunlar millum Streymoy og Eysturoy og millum Streymoy og Sandoy.

Við løgtingslóg nr. 63 frá 22. mai 2023 varð heimild givin til, at P/F Suðuroyartunnilin ókeypis skuldi fáa ymiskt tilfar, sum Landsverk hevði gjørt viðvíkjandi ætlaða undirsjóvartunlinum.

Løgtingið hevur játtað 100 mió kr á fíggjarlógini fyri 2025, sum eru settar í P/F Suðuroyartunnilin sum hækking av partapeninginum, og í uppskotinum til løgtingsfíggjarlóg fyri 2026, sum er lagt fyri Løgtingið 30. september 2025, er ætlanin at játta aðrar 100 mió. kr. sum skulu setast í P/F Suðuroyartunnilin sum enn ein hækking av partapeninginum.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við lógaruppskotinum er at staðfesta politiska semju um at fara undir at fyrireika, prosjektera og bjóða út verkætlanina um Suðuroyartunnil við tilhoyrandi tunnils- og vegakervum,

Við uppskotinum verður tað staðfest, at tað er undirsjóvartunnil millum Sandvík og Djúpadal norðan fyri Skarvanes við tilhoyrandi tunnils- og vegakervum, sum verður fyrireikað, prosjekterað og bjóðað út.

Forkanningararbeiðið, sum Løgtingið við játtan á fíggjarlógunum fyri 2023 og 2024 hevur samtykt, at P/F Suðuroyartunnilin skuldi gera, er komið væl ávegis.

Givið er tó, at fyrireikingararbeiðið heldur fram, samstundis sum farið verður undir at detailprosjektera verkætlanina, so at verkætlanin kann bjóðast út.

Sum partur av prosjekteringini skulu ymisk teknisk og ferðslufaklig viðurskifti á detaljustigi viðgerast og avgreiðast, undir hesum at tryggja, at trygdin er í hásæti bæði undir bygging og tá tunnilin er liðugur.

Endamálið er at fáa til vegar eina neyvari kostnaðarmeting av samlaðu verkætlanini. Tá verkætlanin er liðugt fyrireikað, prosjekterað, bjóðað út, og tilboð eru innkomin, verður neyvari greiða fingin á, hvør kostnaðurin gerst av tunlinum.

Endamálið við lógaruppskotinum er eisini at staðfesta, at tað er P/F Suðuroyartunnilin, sum er byggiharri fyri samlaðu verkætlanina, og at verkætlanin skal góðkennast av Landsverki, sum eisini fer at hava eftirlit við, at verkætlanin verður framd sambært góðkenning.

Umhvørvisárinsmeting er ikki ásett í føroyskari lóggávu, men hendan lógin tryggjar, at avleiðingar av samlaðu verkætlanini á náttúruna og umhvørvið verða lýstar og skipaðar í samráð við Umhvørvismálaráðið og Umhvørvisstovuna. Frágreiðingin skal m.a. fevna um lýsing av náttúru og umhvørvi á staðnum og ta ávirkan, sum ætlanin kann hava á eitt nú fólk og bústaðarøki, og hvørji tiltøk verða sett í verk fyri at avmarka møguliga ávirkan á omanfyrinevndu viðurskifti.

Endamálið er eisini at skipa virksemið hjá P/F Suðuroyartunlinum við lóg og gera greitt, hvør uppgávan hjá P/F Suðuroyartunlinum er, og hvørjar heimildir og skyldu felagið hevur í mun til uppgávurnar. Endamálið er eisini at skapa opinleika, við at P/F Suðuroyartunnilin verður fevnt av innlitslógini.

Væntandi tekur arbeiðið at fyrireika, prosjektera og bjóða út millum hálvt annað og tvey ár, og tí verður tað upp til eitt komandi Løgting at taka støðu til, um verkætlanin skal fremjast, og verður tað gjørt við serstakari løgtingslóg.

Samanumtikið er endamálið við lógaruppskotinum at skapa eitt nøktandi avgerðargrundarlag til eitt komandi Løgting, sum skal taka støðu til, um farast skal undir at gera ein Suðuroyartunnil við tilhoyrandi tunnils- og vegakervum.

**1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**

Uppskotið staðfestir politiska semju um at fara undir at fyrireika, prosjektera og bjóða út verkætlanina um Suðuroyartunnil við tilhoyrandi tunnils- og vegakervum, og at tað verður P/F Suðuroyartunnilin, sum verður byggiharri fyri allari verkætlanini.

Uppskotið ger greitt, at Suðuroyartunnilsverkætlanin við tilhoyrandi tunnils- og vegakervum fevnir um:

- Farleið frá verandi vegi í Traðardali, eysturum Sandsvatn við vegi og møguligum tunli undir Traðarhamri til undirsjóvartunnilin í Djúpadali við íbinding til verandi veg til Skálavíkar og Skarvanes,

- Undirsjóvartunnil millum Djúpadal norðan fyri Skarvanes og Sandvík við atkomutunli til Skúvoyar,
- Veg millum Suðuroyartunnilin og nýggja Sandvíkartunnilin við íbinding í verandi veg í Sandvík,
- Tunnil millum Sandvík og Hvalba (nýggjur Sandvíkartunnil),
- Veg millum nýggja Sandvíkartunnilin og landsvegin frá Hvalbiartunlinum, og
- Uppskotið skipar somuleiðis virksemið hjá P/F Suðuroyartunlinum við ásetingum um m.a. ognarviðurskifti, virkisøki hjá nevndini og ásetir, at P/F Suðuroyartunnilin verður fevndur av innlitslógini frá tí degi, løgtingslógin verður sett í gildi.

Uppskotið staðfestir, at Landsverk verður góðkenningarmyndugleiki, tá tað snýr seg um vegateknisk- og trygdarviðurskifti, og at verkætlanin skal góðkennast av Landsverki, áðrenn verkætlanin verður prosjekterað og bjóðað út.

Uppskotið staðfestir eisini, at Landsverk skal hava eftirlit við, at verkætlanin er framd sambært samsvarandi góðkendu prosjektum, um Løgtingið við serstakari lóg samtykkir at fara undir at fremja verkætlanirnar.

Í uppskotinum er ásett, at P/F Suðuroyartunnilin hevur skyldu til at gera eina frágreiðing, sum lýsir avleiðingar av samlaða verkætlanini á náttúru og umhvørvi, umframt hvørji átøk verða sett í verk fyri at avmarka møguliga ávirkan á náttúru og umhvørvi. Frágreiðingin skal góðkennast av Umhvørvisstovuni, tá hon hevur verið í almennari hoyring.

**Undirsjóvartunnil millum Djúpadal norðanfyri Skarvanes og Sandvík við atkomutunli til Skúvoyar**
Semja er um, at arbeiðast skal víðari við linjuføring millum Sandvík og Djúpadal norðanfyri Skarvanes, og at íbinding í Skúvoy skal knýtast uppí verkætlanina.

Høvuðsgrundgevingin fyri linjuføringini er mettur kostnaður, og at undirsjóvartunnilin skal vera so stuttur sum gjørligt fyri at minka prosjektváðarnar mest møguligt.

Við valdu linjuføring verður undirsjóvartunnilin sambært forprosjektinum 22,8 km langur, og hevur tvær koyribreytir til norður- og suðurkoyrandi ferðslu.

Størsta hall er 5%, sum er í syðra enda á tunlinum, og mesta dýpið er 180 metrar.

Í upprunaliga forprosjektinum er tunnilin somu breidd sum Sandoyartunnilin – ein sokallaður T9,5 tunnil.

Undir viðgerðini av løgtingsmálinum hevur Fíggjarnevndin umrøtt breiddina av undirsjóvartunlinum, og í viðgerðini av málinum hevur verið víst á, at trygdin verður betri, um tunnilin verður breiðari, men at samlaði kostnaðurin økist.

Ætlanin er, at undirsjóvartunnilin verður boðin út við báðum møguleikum, T9,5 og T10,5.

**Skúvoy**
Semja er um, at íbinding av Skúvoy skal verða partur av útboðnum av Suðuroyartunnils-verkætlanini.

Atkomutunnil til Skúvoyar verður tí partur av samlaðu verkætlanini, sum P/F Suðuroyartunnilin skal fyrireika, prosjektera og bjóða út.

Ætlanin er, at atkomutunnilin verður á leið 1,5 km langur, 8,5 m breiður við tveimum banum og við einum halli á uml. 10%.

Neyðugt verður helst at stýra ferðsluni í atkomutunlinum til Skúvoyar fyri at betra um trygdina umframt at forða fyri, at bygdin verður full av bilum og ferðafólki. Hetta kann gerast við at avmarka tungari ferðslu til ávís tíðspunkt og annars at stýra vanligu ferðsluni, uttan at tað gongur út yvir møguleikan hjá fastbúgvandi fólki í Skúvoy at ferðast til og frá oynni.

**Jarðfrøði**
Gjørdar eru jarðfrøðisligar forkanningar sambært tilmæli frá Jarðfeingi av økinum, har Suðuroyartunnilin fer at verða bygdur.

Í høvuðsheitum hevur talan verið um:

- Skrásetingar á landi,
- Kjarnuboringar,
- Seismiskar kanningar av havbotninum, og
- Multibeam kanningar av havbotninum.

Ætlanin er, at Suðuroyartunnilin verður bygdur í stóran mun í miðfláunum (Malinstindur) og ein partur í ovastu fláunum (Enni). Hetta er jarðfrøði, sum góðar royndir eru við at byggja tunlar í. Vágatunnilin, Norðoyartunnilin og partvíst Eysturoyartunnilin vórðu bygdir í miðfláunum. Sandoyartunnilin og partvíst Eysturoyartunnilin vórðu bygdir í ovastu fláunum.

Higartil hevur ikki verið mett, at jarðfrøðin verður truplari, enn hon hevur verið við hinum undirsjóvartunlunum í Føroyum. Tunnilsfelagið og politiska skipanin hava fingið kunning um metingar av jarðfrøðini. Endaliga frágreiðingin frá Jarðfeingi um jarðfrøðiligu viðurskiftini varð liðug í november 2025 og liggur við lógaruppskotinum sum fylgiskjal 38. Hildið verður fram at gera kanningar til nýggja Sandvíkartunnilin.

**Trygd**
Tað er sjálvsagt alt avgerandi, at undirsjóvartunnilin og tilhoyrandi tunnils- og vegakervi eru trygg bæði í byggitíðarskeiðinum, og tá verkætlanin er liðug og tunnil og vegir lata upp fyri ferðslu.

Undirsjóvartunnilin verður útvið 23 km langur, og er longdin ein avbjóðing, tá hugsað verður um trygd bæði í byggitíðini og tá tunnilin er liðugur.

P/F Suðuroyartunnilin hevur víst á, at tað serliga er undirsjóvartunnilsarbeiðið, sum hevur stóran váða, tí arbeitt verður undir havbotninum, eins og arbeitt verður gjøgnum tilfar, sum ongin kennir við vissu, fyrr enn komið er ígjøgnum, hóast jarðfrøðiligar forsagnir fyriliggja. Møgulig óhapp kunnu hava ovurhonds stórar avleiðingar, bæði fyri arbeiðsfólk, fyri samlaðu verkætlanina og fyri landið.

Suðuroyartunnilin er ein langur tunnil, men væntandi við lítlari ferðslu, og parturin av tungari ferðslu er lágur. Tað finst eingin kategori, sum fevnir um tølini fyri Suðuroyartunnil, og tí ber ikki til at sláa upp í talvu, tá metast skal, um trygdin er í lagi. Neyðugt er við ítøkiligum

váðagreiningum, tá søkjast skal um góðkenning hjá myndugleikunum. Hetta verður partur av arbeiðinum, sum skal gerast í sambandi við prosjekteringina.

Norconsult, sum hevur staðið fyri at gera forprojekt, hevur eisini gjørt uppskot til, hvørji trygdarátøk skulu gerast. Fyrsta uppskotið er seinni tillagað, og trygdarrúm eru komin aftrat.

Trygdarátøk í vandastøðu fevna um kunningarskelti og kunning umvegis hátalarar, sum eru knýtt at sjálvvirkandi telduskipan. Í sambandi við eld í tunlinum, er tað rætta at gera at koyra út. Tveir tunnilsmunnar eru, sum eru rýmingarleiðir, og koyrast skal burtur frá eldinum. Tunnilin verður gjørdur, so til ber at venda í tunlinum og koyra út. Í undantaksstøðu kann verða brúk fyri trygdarrúmunum. Luftskiftiskipanin er ein týðandi partur av tilbúgvingini, tá eldur kemur í ein bil í tunlinum, og onkur ikki kann koyra út sjálvur. Luftskiftiskipanin skal megna at blása roykin annan vegin, soleiðis at farast kann inn í tunnilin úr hinum munnanum eftir fólki sum skulu hjálpast út, og síðani skal luftskiftiskipanin blása øvugtan veg, so fólk hinumegin eldin kunnu hjálpast út.

Sum fylgiskjøl liggja ein røð av frágreiðingum við váðametingum, sum lýsa ymsar trygdarspurningar í sambandi við tunnilsarbeiðið og lidna undirsjóvartunnilin. Eisini eru 3. partsmetingar gjørdar av hesum frágreiðingum. Samanumtikið er semja um, at til ber at gera ein Suðuroyartunnil, har trygdin er í lagi. Endalig váðameting verður gjørd í sambandi við prosjekteringina, har endalig støða eisini skal takast til nógvar spurningar, sum hava ávirkan á trygdina.

**Tilhoyrandi tunnils- og vegakervi**

Verandi tunnil til Sandvíkar og tilhoyrandi vegir í Sandvík og Hvalba, og verandi vegastrekki millum ætlaða Suðuroyartunnilin í Djúpadali og Sandoyartunnilin í Traðardali eru ikki tíðarhóskandi ella ikki egnað til høvuðsferðsluna. Um Suðuroyartunnilin ikki kemur upp í Djúpadali, verður kortini neyðugt at dagføra vegin gjøgnum Sandalíð til øktu ferðsluna til eysturbygdirnar.

Politiska ynskið hevur verið, at talan skal verða um eina samlaða verkætlan, sum fevnir bæði um undirsjóvartunnil og tilhoyrandi tunnils- og vegakervi fyri at tryggja, at øll vegastrekki eru við, at verkætlanirnar eru samskipaðar og at verkætlanin kann gerast á mest skynsama hátt búskaparliga.

Umframt undirsjóvartunnilin, fevnir verkætlanin eisini um tilhoyrandi tunnils- og vegakervi í Suðuroynni og á Sandoynni. Talan er um fylgjandi tunlar og vegir:

- Farleið frá verandi vegi í Traðardali, eysturum Sandsvatn við vegi og møguligum tunli undir Traðarhamri til undirsjóvartunnilin í Djúpadali við íbinding til verandi veg til Skálavíkar og Skarvanes,
- Veg millum Suðuroyartunnilin og nýggja Sandvíkartunnilin við íbinding í verandi veg í Sandvík,
- Tunnil millum Sandvík og Hvalba (nýggjur Sandvíkartunnil), og
- Veg millum nýggja Sandvíkartunnilin og landsvegin frá Hvalbiartunlinum.

Víðari fyrireikingar, myndugleikakrøv um eitt nú vegateknisk og ferðslufaklig viðurskifti o.a. skulu endaliga fastleggja, hvar linjuføringarnar til landsvegir og tunnilsvegir skulu vera, áðrenn einstøku partarnir av verkætlanini verða prosjekteraðir, og avvarðandi kommunur og Umhvørvisstovan skulu takast við í tilgongdina.

Einstøku verkætlanirnar eru nærri útgreinaðar í serligu viðmerkingunum til lógaruppskotið.

Upplýsast skal, at einstøku verkætlanirnar eru á ymiskum stigum, tá tað snýr seg um fyrireiking, og at arbeitt verður víðari við verkætlanunum, um Løgtingið samtykkir inniverandi lógaruppskot.

**Uppgávu- og myndugleikabýtið P/F Suðuroyartunnilin og Landsverk**
Politisk semja er um, at almenna partafelagið, P/F Suðuroyartunnilin, skal standa fyri samlaðu verkætlanini t.v.s. bæði undirsjóvartunlinum, tunlunum á landi og vegunum, sum skulu gerast.

At partafelagið stendur fyri samlaðu verkætlanini skal tryggja, at arbeiðið at gera undirsjóvartunnil verður samskipað við arbeiðið at gera tilhoyrandi vegir og tunlar, og soleiðis minka vandan fyri, at til- og frákoyringarvegir ikki eru lidnir og klárir at taka í nýtslu í seinasta lagi, tá koyrandi verður gjøgnum undirsjóvartunnilin.

Politiska ynskið er, at føroyskar fyritøkur skulu hava møguleika at átaka sær partar av verkætlanini. Samstundis hevur tað týdning, at samlaða verkætlanin er samskipað við greiðum uppgávu- og ábyrgdarbýti. Í tann mun tað ikki skapar óskynsom markamót, er ætlanin at skipa samlaðu verkætlanina soleiðis, at føroyskar fyritøkur kunnu bjóða uppá partar av arbeiðinum.

Landsverk er góðkenningar- og eftirlitsmyndugleiki fyri at tryggja vegateknisku dygdina, trygdina og samskipanina við landsvegakervið annars.

Verkætlanin skal góðkennast av Landsverki, áðrenn farið verður undir at prosjektera verkætlanina, og áðrenn verkætlanin verður boðin út. Landsverk skal hava eftirlit við, at verkætlanirnar verða framdar samsvarandi góðkendum prosjektum.

Landsverk skal gjøgnum hvørja fasu í prosjekteringunum hava tilfarið frá P/F Suðuroyartunlinum til góðkenningar og skal harafturat vegna landsstýrisfólkið, sum hevur ábyrgd av Landsverki, góðkenna endaligu prosjektini.

Myndugleikabýtið áleggur eisini P/F Suðuroyartunlinum eina skyldu til leypandi at tryggja, at møguligar broytingar, sum verða gjørdar í verkætlanini undir fyrireiking og prosjektering, verða góðkendar av Landsverki, áðrenn verkætlanin verður bjóðað út.

At velja trygdarstig verður úrslit av eini tilgongd, sum er í gongd og heldur fram saman við prosjekteringini.

Endalig váðameting verður gjørd í sambandi við prosjekteringina, har endalig støða eisini skal takast til nógvar spurningar, sum hava ávirkan á trygdina.

Til ber ikki at brúka útlendskar trygdarásetingar beinleiðis, tí eingin standardur finst fyri undirsjóvartunlar, sum eru so langir sum Suðuroyartunnilin, og sum hava so lítið av ferðslu, sum væntandi verður í Suðuroyartunlinum.

Samskifti hevur verið bæði á politiskum stigi og á embætismannastigi, um myndugleikabýtið og hvussu góðkenningartilgongdin, og standardar v. m. kunnu fáast uppá pláss.

Ætlanin hevur verið og er framvegis, at Landsverk skal gera uppskot til góðkenningartilgongd og standardar, sum taka hædd fyri, at talan er um ein undirsjóvartunnil, sum er langur og hevur lága ferðslu.

Tryggjast skal m.a., at teir normar og standardar, sum Landsverk brúkar og eru galdandi á økinum, tá henda lóg er samtykt í Løgtinginum, verða hildnir. Tá trygd og annað loyvir tí, kann Landsverk geva frávik frá hesum normum og standardum, fyri at tryggja, at verkætlanin kann gjøgnumførast sum ætlað.

Um Løgtingið við serstakari lóg samtykkir at fara undir at fremja verkætlanirnar, skal Landsverk hava eftirlit við, at verkætlanirnar verða framdar sambært samsvarandi góðkendu prosjektum.

**Kostnaður og fígging**
Suðuroyartunnilin og tilhoyrandi verkætlanir verður størsta og mest umfatandi íløga, sum nakrantíð verður gjørd í Føroyum, um hon verður til veruleika. Tí er neyðugt at gera neyðugar greiningar av fígging og váða, áðrenn endalig avgerð verður tikin um at fremja verkætlanina. Búskaparráðið, Landsbankin og onnur hava víst á, at verkætlanin kann hava týðandi avleiðingar fyri búskaparliga haldførið og fíggjarliga rásarúmið, og hava ávarað ímóti at gera so stóra íløgu sum ein Suðuroyartunnil, áðrenn stig eru tikin til at betra um haldførið í almenna búskapinum.

Politiski fylgibólkurin er samdur um, at Suðuroyartunnilin er ein neyðug íløga, um gongdin í Suðuroynni skal vendast, og metir eisini, at talan kann gerast um eina íløgu, sum við tíðini fer at verða góð fyri fíggjarlógina, tí verandi sjóvegis farleið er kostnaðarmikil.

Samstundis eru bæði løgmaður og politiski fylgibólkurin tilvitað um, at óvissan um kostnaðin framvegis er stór, og at tað kann vísa seg, at kostnaðurin av tunlinum gerst munandi hægri enn væntað verður í løtuni, og at kostnaðurin eisini kann gerast ov høgur og tyngjandi fyri fíggjarlógina, politiska rásarúmið og haldførið. Tí fevnir inniverandi uppskot um lógarheimild og játtan til fyrireiking, prosjektering og útbjóðing av verkætlanini.

Kostnaðarmetingar vísa í løtuni, at samlaði kostnaðurin fyri verkætlanina, treytað av valdu linjuføring fyri Suðuroyartunnilin við tilhoyrandi tunnilskervum og vegakervum, er umleið 4,9 mia. kr. (í 2025-prísum). Sí eisini *Kapittul 2.1 Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur*.

Endaligur kostnaður verður kortini ikki kendur, fyrr enn útboð hevur verið. Tað er ein grundleggjandi fyritreyt, at endalig politisk støðutakan um verkætlanina fyrst verður tikin, tá neyvari kostnaðarmeting v.m. fyriliggur. Hetta lógaruppskot veitir tí eisini einans heimild til fyrireiking, prosjektering og útboð. Løgtingið bindur seg sostatt við hesum uppskoti einans til at bera tær útreiðslur, sum eru knýttar at hesum.

P/F Suðuroyartunnilin væntar, at kostnaðirnir komandi tvey árini verða um 70 mió. kr.:

- Prosjektering og gransking v.m. av vegum og tunlum 50 mió. kr.
- Fyrireiking og forkanningar v.m. 10 mió. kr.
- Fyrisiting, prosjektleiðsla, løgfrøðilig ráðgeving v.m. 10 mió. kr.

Um Løgtingið seinni tekur avgerð um at fara undir at fremja verkætlanina, verður neyðugt at keypa lendi og ognir v.m. við tí fyri eyga, at farast kann undir verkætlanina.

Útreiðslurnar verða fíggjaðar av teimum 100 mió. kr., sum longu eru játtaðar á fíggjarlógini fyri 2025. Pengarnir vórðu settir í P/F Suðuroyartunnilin sum hækking av partapeninginum.

Tá verkætlanin hevur verið í útboði, og kostnaðarmetingin verður neyvari, skal politisk støða takast til, um tunnilsverkætlanin skal fremjast. Vísir tað seg, at kostnaðurin er ov høgur, so hevur politiska skipanin møguleika at steðga. Tí er man sinnaður at taka fyrsta stigið, sum bert hevur avmarkaðan fíggjarligan váða við sær.

Vísir tað seg hinvegin, tá tilboðini eru komin inn, at kostnaðurin er á einum støði, sum ikki tyngir fíggjarlógina, fíggjarliga rásarúmið og haldførið ov nógv, samstundis sum politiskur vilji til at fremja verkætlanina og gera Suðuroyartunnilin, verður hetta gjørt við serstakari løgtingslóg.

Eitt ískoyti til fíggingarleistin (fylgiskjal 10), sum eisini varð hjálagt sum fylgiskjal í løgtingsmáli 72/2024, er gjørt, og er hjálagt sum fylgiskjal 37. Ískoytið tekur støði í, at summar av fortreytunum fyri verkætlanina eru broyttur síðani 2024, m.a. orsakað av dagførdum kostnaðarmetingum, broyttum rentufortreytum og valdu linjuføringini. Fíggingarleisturin vísir framvegis, at úrslitið er sera viðkvæmt fyri broytingum í kostnaði og rentu, og at neyðugt er at gera fleiri greiningar, áðrenn endalig støða verður tikin til verkætlanina.

Fíggingarleisturin byggir á, at landið eigur P/F Suðuroyartunnilin og veitir felagnum eginfígging í fyrireikingar- og byggifasuni. Í tíðarskeiðnum 2025–2034 verður ásett at seta 100 mió. kr. árliga inn í felagið, t.v.s. 1 mia. kr. í alt, umframt 350 mió. kr. úr Íleggingargrunninum (løgtingsmál 27/2025). Henda eginfígging minkar tørvin á lántøku og harvið rentukostnað. Restin av fíggingini verður veitt P/F Suðuroyartunlinum sum lán frá landskassanum.

Tá tunnilin er tikin í nýtslu, verður væntað, at gjøld frá brúkarum og rakstrarstuðul frá landinum mynda inntøkugrundarlagið hjá felagnum. Rakstrarstuðulin skal svara til tær sparingar, sum koma av at verandi farleiðir um Suðuroyarfjørð og til Skúvoyar verða niðurlagdar. Sparingarnar verða varandi og eru ein av høvuðsgrundgevingunum fyri, at verkætlanin kann fremjast.

Landsverk hevur síðani 2021 gjørt fleiri kostnað-nyttu greiningar av Suðuroyartunlinum, har verkætlanin er samanborin við verandi farleið.

Fyrstu greiningarnar frá 2021 fevndu um fimm møguleikar, meðan dagførda greiningin frá 2024 tók støði í arbeiðinum við fyrireiking av løgtingsmáli 72/2024 og linjuføringum millum Djúpadal og Sandvík, við og uttan atkomutunli til Skúvoyar.

Í sambandi við fyrireikingina av hesum lógaruppskoti hevur Landsverk í 2025 gjørt enn eina dagførda kostnað-nyttu greining (fylgiskjal 36), sum byggir á avgerðarnotatið, dagfest 20. oktober 2025 (fylgiskjal 27) og tær fýra linjuføringarnar, sum har vórðu lýstar.

Greiningin vísir, at allar kannaðar loysnir hava negativt nettonútíðarvirði, og verkætlanin tí ikki er samfelagsbúskaparliga lønandi út frá reinum búskaparligum atliti. Úrslitið er tó viðbrekið fyri broytingum í serliga tunnilskostnaði og útreiðslum til siglandi farleið. Greiningin staðfestir, at tann valda linjuføringin (millum Djúpadal og Sandvík og at bora upp í Skúvoy) er tann

lutfalsliga besta av teimum kannaðu møguleikunum, hóast hon framvegis vísir negativt nettonútíðarvirði.

### 1.5. Ummæli og ummælisskjal

Lógaruppskotið hevur ligið til ummælis á heimasíðuni hjá Løgmansskrivstovuni í 2 vikur, so at borgarar, privatir felagsskapir, áhugafeløg og myndugleikar fingu møguleikan at gera viðmerkingar til uppskotið. Inn komu 27 ummælisskriv.

Hesir partar hava sent ummælisskriv:

- Grímsfjall
- Húsavíkar kommuna
- Tvøroyrar kommuna
- Hagafelag Føroya
- Uffe Bærentsen
- Skúvoyar kommuna
- Sandoyar Tjóðveldisfelag, Sandoyar Fólkafloksfelag og Sandoyar Sambandsfelag
- Búnaðarstovan
- Jóannes í Dali
- Barbara Vang av Skarði
- Føroya Fuglafrøðifelag
- Tunnilsáhugabólkurin við Jón Sigurdsson, Kristian Stórhamar, Mourits Joensen
- Hvalbiar Kommuna
- Føroya Sílaveiðifelag
- Landsbankin
- P/F Suðuroyartunnilin
- Føroya Arbeiðsgevarafelag
- Landsverk
- FNU
- Náttúrufelagsskapir: Føroya Náttúru- og Umhvørvisfelag, Hagafelagið, Føroya Sílaveiðifelag, Veltan og Føroya Fuglafrøðifelag
- Fíggjarmálaráðið
- Hagastýrið fyri Prestfjall, sunnari partur
- Umhvørvisstovan
- Helgi Nielsen
- Borgarstjórar í Hovs, Pokeris, Vágs og Sumbiar kommunum
- Óli Lassen
- Sands kommuna

**Ummælisfreist og tilgongd**

Fleiri ummælispartar vísa á, at ummælisfreistin er ov stutt. Hesum er Løgmansskrivstovan samd við vísandi til rundskrivið um lógarsmíð hjá Løgmálaráðnum, sum mælir til, at ummælisfreistir eru 4 vikur.

Upplýsast kann, at talan er stórt sæð sama uppskot, sum varð viðgjørt á Løgtingi í undanfarnu tingsetu, og sum fall burtur á Ólavsøku (løgtingsmál 072/2024).

Uppskotið var tá til ummælis í 5 vikur, og vóru 34 ummælisskriv latin Løgmansskrivstovuni.

Løgmansskrivstovan hevði fundir við ymiskar myndugleikar bæði á lands- og kommunalum stigi og á stovnsstigi umframt við privatar áhugapartar.

Uppskotið fekk harumframt umfatandi viðgerð í Fíggjarnevndini hjá løgtinginum.

Uppskotið, sum fyriliggur, er tillagað samsvarandi viðmerkingum og broytingum, sum meirilutin í Fíggjarnevndini skrivaði í álitinum tann 28. apríl 2025. Harumframt tekur uppskotið støði í tilfari frá P/F Suðuroyartunlinum og ráðgeva teirra Norconsult umframt semjum í politiska fylgibólkinum.

Nógvir ummælispartar vísa á, at tað er átaluvert, at avvarðandi kommunur, hagapartar og viðkomandi myndugleikar ikki eru tikin við upp á ráð í sambandi við arbeiðið, tí talan er um eina stóra verkætlan, sum fer at hava umfatandi ávirkan á kommunur, hagar og umhvørvið.

Løgmansskrivstovan skilir og tekur undir við sjónarmiðunum hjá kommunum, hagapørtum, viðkomandi myndugleikum, áhugafelagsskapum og einstaklingum, sum meta, at tey í størri mun áttu at verið tikin við í arbeiðið fyrr í tilgongdini.

Tað er tó umráðandi at vísa á, at hildið verður fram at fyrireika verkætlanina soleiðis, at loysnir verða funnar, sum eru realistiskar, og taka atlit til bæði trygd, umhvørvi, trivnað, fíggjarlógina og soleiðis, at verkætlanin kann góðkennast av avvarðandi myndugleikum.

Viðkomandi partar verða tiknir við í víðari arbeiðið í tann mun, tað er viðkomandi.

Tað er eisini umráðandi at vísa á, at verkætlanin verður í tveimum stigum, og at hetta lógaruppskotið einans heimilar P/F Suðuroyartunlinum at fyrireika, prosjektera og bjóða út – ikki at fremja verkætlanina.

Uppskotið hevur verið til lógartekniska eftirkanning hjá lógartænastuni.

**Samanumtøka av viðmerkingum, tillagingum og broytingum, sum eru gjørdar, síðani uppskotið varð sent til ummælis**

Í sambandi við uppskotið til løgtingslóg um Suðuroyartunnilin eru innkomin fleiri ummælisskriv frá ymiskum myndugleikum, kommunum, felagsskapum og einstaklingum.

Løgmansskrivstovan vísir á, at teir undirsjóvartunlar, ið eru gjørdir í Føroyum, hava at kalla allir havt stóran áhuga og stillað fleiri ymisk og stundum mótstríðandi sjónarmið í miðdepilin.

Atlitini kunnu vera búskaparlig, umhvørvislig og samfelagslig, og hóast tey eru saklig í sjálvum sær, kunnu tey vera mótstríðandi. Ummælisskrivini geva sum heild eina fatan av, at hetta eisini er galdandi við hesi verkætlanini.

Politiskt er eitt ynski um at knýta Suðuroynna í meginøkið.

Búskaparliga standa Føroyar við haldførisavbjóðingum, um átøk ikki verða gjørd fyri at møta avbjóðingunum.

Umhvørvisliga verður víst á, at verkætlanin fer at gera stórt inntriv í náttúru og umhvørvi og er hetta ein kostnaður, sum eigur at viga nógv í avgerðini um linjuføring.

Samstundis má verkætlanin hava neyðugu trygdaratlitini og kunna fremjast á fíggjarliga skynsaman hátt.

Øll hesi atlitini eru ein natúrligur partur av eini verkætlan av hesi støðd og týdningi, sum fevnir um fleiri samfelagsøki og ávirkar bæði náttúru, lokalsamfeløg, vinnulív og samferðslu.

Sum heild er undirtøka millum ummælispartarnar fyri, at Suðuroyartunnilin verður gjørdur. Tað er ikki nakar ummælispartur, sum beinleiðis sigur seg vera ímóti, at Suðuroyartunnil verður gjørdur.

Tó verður víst á, at neyðugt er í størri mun at taka atlit til fíggjarstøðuna hjá landskassanum og fíggjarpolitiska haldførinum. Spurningur verður eisini settur við, um tíðin er tann rætta at fara undir stóru verkætlanina.

Nøkur vísa á, at tey fyrihalda seg ikki til spurningin, um tunnilsverkætlanin skal gerast, men til ávís viðurskifti í verkætlanini, sum tey hava serkunnleika til ella serligan áhuga fyri.

Spurningur verður settur við, um málið er búgvið til støðutakan, og um linjuføringin millum Sandvík og Djúpadal norðan fyri Skarvanes og vegaføringar á Sandi og í Hvalba eru tær røttu.

Flestu ummælispartarnir vísa á, at størri atlit mugu takast til náttúruna, serliga í Sandoynni og eisini í Hvalba, og onkur vísir á náttúruna í Skúvoy. Víst verður serliga á, at Sandoyggin er serstøk – bæði tá tað snýr seg um fuglalív, landbúnað og vátlendi.

Nakrir ummælispartar mæla til, at ein innleiðandi og yvirskipað meting av árinum á náttúru (strategisk umhvørvisárinsmeting) verður gjørd av linjuføring millum Djúpadal og Sandvík og alternativu linjuføring millum Sandvík og norðan fyri Sandsbygd fyri at lýsa avleiðingarnar á umhvørvið og náttúruna av báðum farleiðum, áðrenn støða verður tikin til linjuføring.

Fleiri ummælispartar vísa á, at linjuføringin, sum tunnilsáhugabólkurin mælir til norðan fyri Múlan er betri bæði fyri umhvørvið og náttúruna og fyri tey, sum skulu brúka farleiðina. Víst verður millum annað á, at alternativa farleiðin hevur við sær, at sleppast kann undan tunnils- og vegagerð á Sandoynni, og at ferðatíðin verður styttri.

Nógv, millum onnur Sands bygdaráð, Skúvoyar kommuna, Húsavíkar kommuna, náttúru og umhvørvisfelagsskapirnir, tunnilsáhugabólkurin og Landsverk mæla tí til, at linjuføringin verður broytt.

Tey flestu vísa á, at neyðugt er at gera fleiri kanningar, áðrenn Løgtingið kann taka støðu til málið út frá haldgóðum grundarlagi.

Semja er í politiska fylgibólkinum um at halda fast í linjuføringini, sum P/F Suðuroyartunnilin upprunaliga hevur mælt til millum Sandvík og Djúpadal, og at ein atkomutunnil skal gerast til Skúvoyar.

Harumframt leggur løgmaður dent á, at tíðin er búgvin til, at Løgtingið tekur støðu til tvey viðurskifti:

1. Skal Suðuroyartunnil við tilhoyrandi tunnils- og vegakervum fyrireikast, prosjekterast og bjóðast út?
2. Skal tað framvegis vera P/F Suðuroyartunnil, sum hevur royndir frá væl eydnaðum verkætlanunum við Eysturoyar- og Sandoyartunlunum, sum er byggiharri og skal standa fyri fyrireikingararbeiðinum, prosjekteringini og útboðnum av verkætlanini?

**Uppskotið, sum verður lagt fyri Løgtingið, er broytt nakað í mun til tað, sum var sent til ummælis.**
§ 3 er broytt samsvarandi semju í politiska fylgibólkinum um, at tilhoyrandi tunnils- og vegakervi á Sandoynni skal broytast soleiðis, at ferðslan millum Sandoyartunnilin í Traðardali og Suðuroyartunnilin í Djúpadali verður leidd uttanum Sands bygd og landbúnaðarjørðina.

Løgmansskrivstovan skal upplýsa, at ein ætlan um at gera tunnil undir Traðarhamar er leysliga umrødd við Sands bygdaráð, men hevur ikki verið til ummælis, og at tað fyriliggja ikki fakligar metingar av, hvørjar umhvørvisligar og fíggjarligar avleiðingar ein møguligur tunnil undir Traðarhamar hevur, og hvønn mun tað ger á val av linjuføring.

Løgmansskrivstovan skal somuleiðis vísa á, at vegaføringar og tunnilsætlanir verða fyrireikaðar saman við bygdaráðunum og Umhvørvisstovuni.

Serligu viðmerkingarnar til ávísar ásetingar eru tó tillagaðar nakað við nærri útgreiningum fyri at beina burtur ivamál, sum eru komin fram í ummælisskrivunum.

Tilvísingar í §§ 5, 6 og 8 eru tillagaðar samsvarandi broyting í § 3.

§ 8, stk. 1 er broytt soleiðis, at tilvísingin til náttúruverndarlógina er røtt. Talan er um eina tekniska broyting.

Aðrar broytingar eru ikki gjørdar í sjálvum lógartekstinum, men serligu viðmerkingar til § 4 eru tillagaðar og nágreinaðar samsvarandi viðmerking frá Landsverki um ógreidleika viðvíkjandi góðkenningar- og eftirlitsleiklutinum.

Ummælisskrivini eru viðfest sum fylgiskjøl 39 – 65 og ein samanskriving av øllum ummælisskrivum er viðløgd sum fylgiskjal 66. Fleiri, sum hava sent ummæli inn í sambandi við hetta lógaruppskotið, hava viðfest áður sent ummælisskriv til løgtingsmál 072/2024 um Suðuroyartunnil, sum fall burtur á ólavsøku. Tí verður eisini ummælisskrivið frá tí løgtingsmálinum viðfest fylgiskjali 66.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

Inniverandi uppskot er gevur heimild til at fyrireika, prosjektera og bjóða út verkætlanina.

Í lýsingunum av avleiðingunum av uppskotinum verður greitt, hvørjar avleiðingar inniverandi uppskot hevur. Men tað verður eisini í ein ávísan mun víst á, hvørjar avleiðingar væntast, um Løgtingið seinni ger av við serstakari løgtingslóg at fremja samlaðu verkætlanina.

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

*Avleiðingar fyri landið*
P/F Suðuroyartunnilin varð stovnað við 4 mió. kr. í partapeningi, sum varð játtaður á løgtingsfíggjarlógini fyri 2022 við tí endamáli at gera undirsjóvartunnil millum Suðuroy og Sandoy. Í 2023 og 2024 vórðu játtaðar tilsamans 20 mió. kr. til at fyrireika undirsjóvartunnil millum Suðuroy og Sandoy við tilhoyrandi vegagerð v.m. Forkanningararbeiðið er komið væl ávegis, og fyrireikingararbeiðið heldur fram, samstundis sum farið verður undir at detailprosjektera verkætlanina, so at hon kann bjóðast út.

Inniverandi uppskot gevur einans heimild til, at P/F Suðuroyartunnilin fer undir at fyrireika, prosjektera og bjóða út verkætlanina um undirsjóvartunnilin millum Suðuroy og Sandoy við tilhoyrandi tunnils- og vegakervum. Tí bindir Løgtingið seg við hesum uppskoti einans til at bera tær útreiðslur, sum eru knýttar at hesum.

P/F Suðuroyartunnilin væntar, at kostnaðirnir komandi tvey árini verða um 70 mió. kr.:

- Prosjektering og gransking v.m. av vegum og tunlum 50 mió. kr.
- Fyrireiking og forkanningar v.m. 10 mió. kr.
- Fyrisiting, prosjektleiðsla, løgfrøðilig ráðgeving v.m. 10 mió. kr.

Um Løgtingið seinni tekur avgerð um at fara undir at fremja verkætlanina, verður neyðugt at keypa land og ognir v.m. við tí fyri eyga, at farast kann undir verkætlanina. Skjótast gjørligt eftir samtykt Løgtingsins av hesum lógaruppskotinum, fer P/F Suðuroyartunnilin at arbeiða fram ímóti at gera treytaðar keypssáttmálar. Útreiðslurnar verða fíggjaðar av teimum 100 mió. kr., sum longu eru játtaðar á fíggjarlógini fyri 2025.

Í løgtingsfíggjarlógini fyri 2025 vórðu játtaðar 100 mió. kr. at seta í felagið sum partapeningur, og ætlanin er harumframt at játta 100 mió. kr. árliga í tíðarskeiðnum 2026 – 2034, tilsamans 1 mia. kr. í tíðarskeiðnum 2025 – 2034. Upphæddin er partur av samlaða løgukarminum hjá landinum, sum eftir ætlan fer at liggja um 600 mió. kr. árliga (í 2024-prísum) komandi árini.

Tá verkætlanin hevur verið í útboði og ein meira neyv kostnaðarmeting fyriliggur, skal støða takast til, um eitt uppskot til serstaka løgtingslóg skal leggjast fram, sum gevur P/F Suðuroyartunlinum heimild til at fremja verkætlanina. Um Løgtingið samtykkir lógaruppskotið um fyrireiking og útboð av Suðuroyartunlinum, verður arbeiðið framhaldandi at nágreina kostnað, fígging og samfelagsnyttu soleiðis, at ein samlað og dagført lýsing kann leggjast fram í sambandi við eina møguliga verklagslóg.

Til ber tá at gera eina meira ítøkiliga og nágreinaða fíggingargreining, tá bæði byggikostnaður og láni- og rentumøguleikar eru kendir. Henda greining verður tá saman við øðrum tilfari grundarlag undir endaligu politisku støðutøkuni um at gera Suðuroyartunnilin.

Um Løgtingið tekur avgerð um ikki at fremja verkætlanina, fer tann upphæddin, ið er játtað á fíggjarlógini, uttan tann parturin, sum verður brúktur í fyrireikingar- og útboðsfasuni, aftur í landskassan.

Um Løgtingið tekur avgerð um ikki at fremja verkætlanina, verður tað heldur ikki aktuelt fyri Íleggingargrunnin at lata eitt rentu- og avdráttarfrítt lán upp til 350 mió. kr.

***Kostnaðarmeting av Suðuroyartunlinum við tilhoyrandi tunnils- og vegakervum***
P/F Suðuroyartunnilin hevur í avgerðarnotatinum frá 20. oktober 2025 (fylgiskjal 27) mett samlaðu verkætlanarútreiðslurnar av einum undirsjóvartunli millum Djúpadal og Sandvík við atkomutunli til Skúvoyar til smáar 4,9 mia. kr. (í 2025-prísum). Í verkætlanini er tá eisini íroknað atknýttir vegir og tunlar í Sandoy fram til Sandstunnilin og í Suðuroy fram til vegin úr Hvalbiartunlinum. Síðani hevur løgmaður í samráð við politiska fylgibólkin gjørt av, at ynskið frá bygdaráðnum á Sandi og politisku økisfeløgunum á Sandi um, at ferðsla frá Suðuroyartunlinum til Sandoyartunnilin ikki skal ganga gjøgnum bygdina, skal gangast á møti. Mett verður, at kostnaðarmetingin eigur at hækkast við uml. 70 mió. kr.

**Talva 2: Verkætlanarkostnaður, mió. kr.**

| **Partur av verkætlanini** | **Djúpadal – Sandvík við atkomutunli til Skúvoy v.m.** |
|---|---|
| Suðuroyartunnilin | 3.683 |
| Vegir og tunnil í Suðuroy | 408 |
| Tunnilsvegur í Sandoy | 112 |
| Vegur til eystursíðuna av Sandoy | 230 |
| Rýmingarrúm fyri hvørjar 500 m | 230 |
| Atkomutunnil Skúvoy | 212 |
| **Samlaður verkætlanarkostnaður** | **4.875** |

Kelda: Avgerðarnotat, P/F Suðuroyartunnilin (Fylgiskjal 27)

Orsakað av fyriliti fyri komandi útboði, og fyri at verja fíggjarligu áhugamálini hjá P/F Suðuroyartunlinum og tí almenna, er einki alment innlit í kostnaðarmetingina, sbrt. løgtingslóg um innlit í fyrisitingina, §13, nr. 5 og nr. 6. Í sambandi við eitt útboð, kann kunnleiki til smálutirnar í kostnaðarmetingini ávirka tilboðsgevararnar og hava við sær, at prísurin á verkætlanini verður hægri enn neyðugt.

Givið er, at ein neyv kostnaðarmeting ikki fæst, fyrr enn verkætlanin er prosjekterað, boðin út og tilboðini eru komin inn, og tað er hetta, sum verður sett í gongd, um hetta lógaruppskotið verður samtykt.

***Fíggingarleistur***
Í 2023 varð farið undir at lýsa og menna uppskot til ein fíggingarleist fyri ein møguligan Suðuroyartunnil. Í frágreiðingini um fíggingarleist er roynt at geva eitt yvirskipað yvirlit yvir, hvussu verkætlanin fer at ávirka fíggjarlógina yvir eitt longri tíðarskeið út frá nøkrum givnum fortreytum um lántøku, rentu, ferðslu og kostnaðir við at halda verandi farleið o.a.

Víst verður til fylgiskjøl 10 og 37 viðvíkjandi fíggingarleistinum. Fylgiskjal 10 lá við sum fylgiskjal 11 til løgtingsmál 72/2024, men nú er eisini lagt við eitt ískoyti frá desembur 2025 (fylgiskjal 37). Nýggja fylgiskjalið inniheldur dagførdar útrokningar/simuleringar vegna broyttar fortreytir síðan oktober 2024.

Hvussu stór ávirkanin verður á fíggjarlógini, veldst í stóran mun um kostnaðin av tunlinum, og hvussu høgt kapitalinnskot landið setir í verkætlanina, áðrenn tunnilin verður liðugur. Kostnaðurin av verandi farleið um Suðuroyarfjørð er høgur og varandi. Tí verður sparingin á fíggjarlógini lutfalsliga høg, tá tunnilin er liðugur, og sjóvegis farleiðin verður niðurløgd. Í mun til lógaruppskotið, sum varð lagt fram í undanfarnu tingsetu og framlagt 7. mars 2024, fevnir tann nú valda linjuføringin fyri Suðuroyartunnilin eisini um ein atkomutunnil til Skúvoyar. Við at verandi farleið til Skúvoyar eisini verður niðurløgd, fæst eisini her ein varandi sparing á fíggjarlógini, bæði viðvíkjandi rakstri og nýggjum íløgum. Sparingarnar, ið stava frá hesum, eru við til at fíggja nýggja tunnilin.

***Kostnað-nyttu greining av Suðuroyartunlinum***

Kostnað-nyttu greiningarhátturin verður aloftast brúktur altjóða til at meta um almennar íløgur í infrakervið. Høvuðsendamálið við kostnað-nyttu greiningini er at lýsa tær samfelagsbúskaparligu avleiðingarnar, áðrenn valt verður millum ymiskar loysnir. Ein kostnað-nyttu greining tekur tó ikki hædd fyri øllum og hevur sínar avmarkingar.

Sum partur av forkanningini av Suðuroyartunlinum, gjørdi Landsverk í 2021 eina kostnað-nyttu greining av fimm ymiskum møguleikum í mun til verandi farleið til Suðuroyar, sí fylgiskjal 13.

Løgmansskrivstovan bað síðani Landsverk um at gera eina dagførda kostnað-nyttu greining í sambandi við fyrireiking av løgtingsmáli 72/2024, sum er í samsvari við ætlanina hjá politiska myndugleikanum um at gera ein undirsjóvartunnil millum Skarvanes og Sandvík. Ítøkiliga varð biðið um, at hesar linjuføringar vórðu kostnað-nyttu greinaðar:

- Skarvanes – Sandvík, og
- Skarvanes – Sandvík við tunli upp í Skúvoy (+400 mió. kr.).

Dagførda kostnað-nyttu greiningin hjá Landsverki (fylgiskjal 12) vísti, at verkætlanin at byggja ein Suðuroyartunnil við hesum linjuføringum, øll fóru at hava við sær eitt negativt nettonútíðarvirði (NNV).

At NNV er negativt merkir, at frá einum búskaparligum sjónarhorni eiga hesar íløgur ikki at fremjast, tí tær geva eitt samfelagsbúskaparligt tap. Kostnað-nyttu greiningin vísir eisini, at úrslitið er serliga viðbrekið fyri broytingum í tunnilskostnaðinum og útreiðslunum til rakstur av ferjum, harundir íløgur í nýggjar ferjur.

Í sambandi við fyrireikingararbeiðið til hetta lógaruppskot, bað Løgmansskrivstovan Landsverk um eina dagførda kostnað-nyttugreining av teimum fýra linjuføringunum, sum vóru í avgerðarnotatinum. Nýggja kostnað-nyttugreiningin frá oktober 2025 (fylgiskjal 36) vísti eisini eitt negativt NNV, og at allir fýra møguleikarnir geva eitt samfelagsbúskaparligt tap samanborið við verandi farleið. Greiningin vísti tó eisini, at tann valda linjuføringin 1A (Djúpidalur–Sandvík við at bora upp í Skúvoy) er hin lutfalsliga frægasta loysnin.

*Avleiðingar fyri kommunur*
Uppskotið kann hava fíggjarligar avleiðingar fyri kommunur, sum skulu dagføra brunaøkið og gera tillagingar til øktu ferðsluna í lokaløkinum.

Upplýsast skal, at undirsjóvartunnilin og aðrir tunlar verða partur av einari almennari tilbúgvingarætlan, um teir verða bygdir. Tilbúgving er eitt kommunalt øki, og vísast kann til loysnina, sum Tórshavnar kommuna og kommunurnar á Sandoynni gjørdu í sambandi við at Sandoyartunnilin læt upp.

Hvussu tilbúgvingarætlanin og tað ítøkiliga uppgávubýtið, umframt fíggingin av tilbúgvingini, at enda skulu síggja út, er nakað, sum skal viðgerast millum allar viðkomandi partar, áðrenn byggingin verður sett í verk.

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Samlaða verkætlanin er umfatandi og fer at hava umsitingarligar avleiðingar fyri bæði land og kommunur. Tað verða fleiri myndugleikar, sum fara at hava ein leiklut í teimum ymisku stigunum í verkætlanini. Umráðandi er, at P/ F Suðuroyartunnilin í sambandi við fyrireiking og prosjektering av verkætlanini, nágreinar, hvørji loyvi og góðkenningar krevjast frá øðrum myndugleikum, og at neyðug loyvi fyriliggja, áðrenn farið verður undir at fremja ætlanina.

Neyðug tíð og orka má setast av til samskiftið millum P/F Suðuroyartunnilin og avvarðandi myndugleikar á økinum.

Lógaruppskotið ásetir, at P/F Suðuroyartunnilin er fevnt av innlitslógini frá tí degi, lógin fær virknað.

Niðanfyri verður í stuttum greitt frá, hvørjir myndugleikar fara at hava ein leiklut í sambandi við verkætlanina. Givið er, at tað helst verða fleiri myndugleikar og stovnar.

**Landsverk**
Í undanfarnu lógum um at byggja undirsjóvartunlar í Føroyum hevur verið galdandi, at Landsverk skal góðkenna samlaða prosjektið, og eisini hevur verið ásett, at Landsverk skal hava eftirlit við sjálvari byggingini.

Uppskotið hevur við sær arbeiðsbyrðu til Landsverk, sum skal góðkenna prosjektini áðrenn prosjektering, og áðrenn arbeiðið kann bjóðast út, og eisini skal hava eftirlit við sjálvari byggingini. Hetta fyri at tryggja vegafakligu dygdina, trygdina og samskipanina við landsvegakervið annars.

Landsverk skal eftir hvørt stig í prosjekteringunum fáa tilfarið frá P/F Suðuroyartunlinum til góðkenningar og skal harafturat, vegna landsstýrisfólkið, góðkenna endaligu prosjektini.

Landsverk skal hava eftirlit við, at verkætlanirnar verða framdar sambært samsvarandi góðkendum prosjektum. Landsverk skal hava atgongd til viðkomandi tilfar hjá P/F Suðuroyartunlinum.

Uppskotið hevur áseting um, at Suðuroyartunnilin ikki er partur av landsveganetinum sambært løgtingslóg um landsvegir við seinni broytingum. Tó ásetir uppskotið, at arbeiðið við Suðuroyartunlinum við tilhoyrandi tunnils- og vegakervum fer fram eftir somu reglum sum

fyri landsvegagerð, og at landsstýrismaðurin hevur tær heimildir, sum eru ásettar í løgtingslóg um landsvegir viðvíkjandi ferðslu, vegum og tunlum.

Uppskotið nágreinar, at skipan av ferðsluni í tunlunum fer fram eftir somu reglum og leiðreglum sum fyri landsvegir. Lógirnar hava eisini havt sum fyritreyt, at tunnilseigarin hevur rætt til, uttan gjald, at binda í landsveganetið.

**Umhvørvisstovan**
Í sambandi við, at verkætlanirnar verða fyrireikaðar og prosjekteraðar, verður eisini umhvørvisárinsmeting gjørd, og P/F Suðuroyartunnilin skal hava neyðuga umhvørvisgóðkenning frá Umhvørvisstovuni av verkætlanunum, eins og tá Eysturoyar- og Sandoyartunlarnir vórðu gjørdir.

Í sambandi við møguliga ognartøku, sum kann gerast viðkomandi, um støða verður tikin til at fremja verkætlanina, er neyðugt, at Umhvørvisstovan góðkennir frábýti og matrikulerar sjálvan portalin.

**Friðingarmyndugleikar**
Um tunnilsmunnarnir liggja nær sjónum ella í uttangarðslendi v.m., so skal friðingarmyndugleikin góðkenna bygginginga, t.v.s. staðsetingina av sjálvum tunnilsmunnanum og nýggjum tilhoyrandi vegum.

Í sambandi við verkætlanina at byggja ein Suðuroyartunnil við tilhoyrandi tunnils- og vegakervum skal greiða fáast á, hvar grótgoymslurnar skulu liggja.

Í hesum sambandi skal friðingarmyndugleikin, t.e. lokala friðingarnevndin og Yvirfriðingarnevndin, góðkenna staðsetingina av grótgoymslum, tí hesar fara helst at liggja í uttangarðsøki. Roknast má tí við, at staðsetingin av grótgoymslum skal góðkennast av friðingarmyndugleikanum og byggivaldinum á staðnum, um staðsetingin er partur av byggisamtyktini.

**Búnaðarstovan**
Í sambandi við byggingina av Eysturoyar- og Sandoyartunlum hevur Búnaðarstovan havt ein týðandi leiklut í sambandi við útvegan av lendi til vegagerð til tunnilsmunnan og við staðseting av grótdepotum v.m, tá talan hevur verið um festijørð.

**Arbeiðseftirlitið**
Tá arbeiðið fer í gongd, skal Arbeiðseftirlitið hava fráboðan um byggiplássið, og ger regluligt eftirlit sambært arbeiðsumhvørvislógini. Um arbeiðstakarin nýtir útlendska arbeiðsmegi, skulu eisini neyðug loyvir fáast til vegar frá útlendingastýrinum v.m.

**Jarðfeingi**
Jarðfeingi hevur og fer framhaldandi at hava ein virknan leiklut í sambandi við at útvega jarðfrøðiligt grundarlag undir verkætlanini. Vanligt er, at Jarðfeingi fylgir upp á jarðfrøðina í byggitíðini við skrásetingum í tunlinum. Eisini skal Jarðfeingi fáa í varðveitslu sjáldsom grótsløg og soðsteinar.

**Kommunur**
Kommunurnar, sum liggja har, sum undirsjóvartunnilin og tunlarnir hava tunnilsmunnar, fara at hava ein ávísan leiklut í sambandi við, at verkætlanirnar verða fyrireikaðar og prosjekteraðar.

Nógvir spurningar eru at taka støðu til í sambandi við eina so stóra og umfatandi verkætlan sum hesa.

Í víðari tilgongdini í arbeiðinum er neyðugt at fáa greiðu á, í hvønn mun at kommunurnar skulu geva loyvi til uppsetan av arbeiðsskúrum og loyvi til ymiskt fyribils og varandi frárensl sum stendst av ætlanini.

**Tilbúgving**
Í sambandi við bygging av einum Suðuroyartunli er støðan tann, at ein tunnil eisini verður partur av einari almennari tilbúgvingarætlan.

Í hesum sambandi kann spurningur taka seg upp, hvussu tilbúgvingin kring tunnilsmunnarnar verður skipað.

Sambært galdandi lóg er hetta eitt kommunalt øki, og tí verður ikki mett, at tilbúgvingarmyndugleikin í sjálvum sær skal góðkenna tunnilsbyggingina.

Tilbúgvingarmyndugleikin eigur at verða tikin við upp á ráð, áðrenn byggingin verður sett í verk.

Hvussu tilbúgvingarætlanin, ítøkiliga uppgávubýtið, og fíggingin av tilbúgvingini, verður, er nakað, sum skal viðgerast millum allar viðkomandi partar og avgerð takast, áðrenn byggingin verður sett í verk.

**Brunamyndugleikin**
Undirsjóvartunnilin og tunlarnir skulu hava neyðuga brunagóðkenning.

Í sambandi við fyrireiking og prosjektering verða Arbeiðs- og brunaeftirlitið og lokalu brunamyndugleikarnir tikin við samsvarandi tilbúgvingarlógini.

**Løgreglan**
Løgreglan skal góðkenna skeltisætlanir, undir hesum møguligar avmarkingar, t.d. forboð fyri, at fólk eru til gongu í tunlinum ella koyra við prutli.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Politiska ynskið er, at føroyskar fyritøkur skulu hava møguleika at átaka sær partar av verkætlanini, og ætlanin er, at útbjóðingartilfarið verður soleiðis háttað, at til ber at bjóða uppá samlaðu verkætlanina við og uttan tilhoyrandi tunnils- og vegakervi og partar av tilhoyrandi tunnils- og vegakervi.

Byggingin av einum Suðuroyartunli við tilhoyrandi tunnils- og vegakervum kann fáa stóran týdning fyri føroysku byggivinnuna. Orsøkin er, at ringvirkningar frá ein slíkari verkætlan eru sera stórir, tí nógvar føroyskar fyritøkur og arbeiðsfólk fara at verða knýtt at verkætlanini í eini 8 – 10 ár. Hetta var soleiðis, tá byggingin av Eysturoyar- og Sandoyartunlunum bleiv gjørd.

Tá Suðuroyartunnilin verður liðugur, fer hann at hava sera stóran týdning, bæði fyri fólk og vinnu. Fyri fólk fer hann at hava stóran týdning, tí at arbeiðsmarknaðurin fer helst at økjast við øktum íløgum í vinnuvirksemi. Haraftrat fáa suðuroyingar betri møguleika at arbeiða

aðrastaðni, eins og fólk norðanfjørðs kunnu arbeiða í Suðuroynni, tá sambandið gerst munandi betri.

Fyri vinnuna í Suðuroynni fer ein Suðuroyartunnil at hava sera stóran týdning. Lættari verður at fáa veitingar til oynna, eins og lættari verður at útflyta framleiddar vørur. Hugsast kann eisini, at vinnur, sum í dag hava torført við at klára seg í Suðuroy, í framtíðini fara at klára at standa seg í kappingini við vinnuna norðanfjørðs.

Uppskotið verður ikki mett at hava fyrisitingarligar avleiðingar fyri vinnulívið.

## 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Hetta uppskotið fer í sjálvum sær ikki at hava avleiðingar fyri umhvørvið.

Tað fer at hava avleiðingar fyri umhvørvi og náttúru, um Løgtingið um eini 2 ár samtykkir at verkætlanin at gera Suðuroyartunnil við tilhoyrandi tunnils- og vegakervum skal gerast.

Talan er um eina stóra og umfatandi verkætlan, sum fevnir bæði um undirsjóvartunnil, tunlar og vegir í Sandoynni og í Suðuroynni.

Bæði í Suðuroynni og í Sandoynni eru serstøk náttúruøki við nógvum fjølbroyttum djóra-, plantu- og fuglalívi, sum hava týdning fyri økið og náttúruna í Føroyum sum heild, sum helst fara at verða ávirkað av verkætlanunum.

Í sambandi við, at verkætlanin verður fyrireikað, verða kanningar og frágreiðing gjørdar um, hvørja ávirkan verkætlanin fer at hava á umhvørvið, náttúruna, lívfrøðiliga margfeldið og inntriv í lendið, sum stendst av samlaðu verkætlanini, fyri at avmarka ávirkanina á umhvørvið, náttúruna og djóralív mest møguligt.

Harafturat verður eisini krav um, at undirsjóvartunnilin skal hava umhvørvisgóðkenning frá Umhvørvisstovuni eftir sama leisti sum Eysturoyar- og Sandoyartunnilin. Tá slíkar verkætlanir verða bodnar út, verða sett strong umhvørviskrøv til tær fyritøkurnar, sum skulu standa fyri byggingini. Tá farið verður undir at detailprosjektera verkætlanina, verða umhvørviskrøv sett til byggifyritøkuna, sum skal standa fyri byggingini.

### Grót

Við hvønn endan av Suðuroyartunlinum verður runt roknað uml. 1 millión $m^3$ av avlopsgróti, umframt grót frá Sandvíkartunlinum og einum møguligum tunli undir Traðarhamar.

Ein stór grótnøgd er ein umhvørvisavbjóðing til greitt er, hvat grótið skal nýtast til, og tað er neyðugt, at støða verður tikin til grótið, áðrenn farið verður í gongd við at gera undirsjóvartunnilin.

Avbjóðingin við avlopsgrótinum er í sambandi við ein Suðuroyartunnil størri enn í undanfarnum verkætlanum, tí mongdirnar av gróti eru munandi størri í sama stað sammett við undanfarnar tunnilsverkætlanir.

Tá ið sprongt verður fyri undirsjóvartunlum, verða stórar nøgdir av spreingievni nýttar. Hetta merkir, at avlopsgrótið í høvuðsheitum er smágrót, umframt at styrkin á grótinum ofta er lítil, orsakað av hørðu spreingingunum og ymisku flágunum arbeitt verður ígjøgnum. Slagið,

góðskan og støddin á avlopsgrótinum avmarka tí, hvat grótið kann nýtast til. Avlopsgrót úr tunnilsverkætlanum hevur áður verið nýtt sum fylligrót í vegir, og til dømis til havnabygging, víðkan av havnaløgum og líknandi.

Samskift er við borgarstjórarnar í teimum sjey kommununum í Suðuroynni, sum hava víst áhuga fyri, at grótið verður brúkt til verkætlanir, sum kommunurnar fara undir komandi árini um at gera eina ætlan fyri, hvat grótið Suðuroyarmegin kann brúkast til.

Nakað av grótinum kann nýtast til tilhoyrandi vegagerð og møguligar ljóðdoyvandi vollar framvið vegum.

Til forprosjektið, sum P/F Suðuroyartunnilin hevur gjørt, er eisini ætlan gjørd fyri, hvar og hvussu grótið kann tyrvast nær báðar tunnilsmunnarnar í Sandvík og Djúpadali. Við hesum hevur felagið eina ætlan fyri, hvussu avbjóðingin við avlopsgróti kann loysast, um tað ikki eydnast at fáa avtalu við annan part sum kann brúka grótið og vil rinda fyri flutningin av grótinum frá tunnilsmunnanum til nýtslu aðra staðni.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Uppskotið hevur í sjálvum sær ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

Verður Suðuroyartunnilin bygdur, fer ávirkanin á Suðuroynna væntandi at verða hin sama, sum tá fast samband varð gjørt til Vágarnar, Norðoyggjar og Sandoynna. Væntast kann, at afturgongdin í fólkatalinum fer at minka, arbeiðsloysið fer at falla og íløgur í t.d. vinnulívið fara at økjast. Víst verður annars til frágreiðingina "Álit um møguleikar, fyrimunir og vansar, at gera ein Suðuroyartunnil" frá juni 2019 (Fylgiskjal 14). Hóast nøkur ár eru síðani, at frágreiðingin varð skrivað, verður ikki mett, at fyritreytir og niðurstøður eru broyttar. Harumframt kann væntast ávirkan á Sandoynna, tí koyrandi ferðsla til og úr Suðuroynni verður umvegis Sandoynna.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Uppskotið kann hava avleiðingar fyri fólk, sum búgva í Suðuroy og fólk, sum umhugsa at flyta til Suðuroyar, um Løgtingið samtykkir at fara víðari við ætlanini.

Í 2019 varð »Álit um møguleikar, fyrimunir og vansar, at gera ein Suðuroyartunnil« handað landsstýrismanninum við samferðslumálum.

Í álitinum verður víst á, at tað er trupult at siga nakað eintýðugt um, hvussu fast samband við eitt meginøki ávirkar hugin at seta búgv og trivnaðin í einum útjaðara. Royndir, bæði í Føroyum og uttanlands, vísa, at tað er ymiskt.

Í Vágum hevur verið ein javnur vøkstur, síðani tunnilin kom í 2002, meðan gongdin í fólkatalinum í Norðuroyggjum, sum fingu fast undirsjóvarsamband í 2006, hevur verið tann sama, sum í landinum samanlagt.

Í álitinum verður eisini víst á, at møguleikin at flyta seg ímillum øki, skapar ikki av sær sjálvum økt fólkatal. Ofta eru onnur atlit, t.d. bústaðarmøguleikar, vælferðartænastur, trivnaðartilboð og starvsmøguleikar, sum hava størri týdning fyri, hvar man velur at seta búgv.

Sum útgangsstøði kann tó sigast, at fast samband hevur við sær ein størri arbeiðsmarknað og størri útboð av arbeiðsmegi, eins og tað kann geva nýggjar møguleikar at velja sær, bæði starvsleið og heimstað, tá mann kann arbeiða eitt stað og búgva eitt annað.

### 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum

Lógaruppskotið fevnir ikki um øki, sum eru fevnd av millumtjóðasáttmálum, ið Føroyar hava skyldu at fylgja.

### 2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

Uppskotið verður ikki mett at hava avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar á økinum.

**1) Hoyvíkssáttmálin**

Mett verður ikki, at uppskotið hevur nakrar avleiðingar fyri Hoyvíkssáttmálan.

**2) Evropeiski mannarættindasáttmálin, EMRS**

Mett verður ikki, at uppskotið hevur nakrar avleiðingar fyri EMRS.

**3) Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**

Mett verður ikki, at uppskotið hevur avleiðingar fyri Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek. Verður undirsjóvartunnilin við tilhoyrandi tunnils- og vegakervum framdur, fáa fólk í Føroyum, sum bera brek og hava tørv á tænastum og viðgerð frá Heilsuverki Føroya, við einum Suðuroyartunli léttari og betri atgongd til tey trý sjúkrahúsini í landinum. Harumframt fáa fólk, sum búgva í Suðuroynni og hava tørv á tænastum frá eitt nú sálarfrøðingi, léttari atgongd til tænasturnar, sum liggja á meginlandinum.

### 2.9. Markaforðingar

Lógaruppskotið hevur ikki við sær kendar markaforðingar.

### 2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv

Uppskotið hevur ongar slíkar.

### 2.11. Skattir og avgjøld

Uppskotið hevur ongar slíkar ásetingar.

### 2.12. Gjøld

Í uppskotinum § 6, stk. 1 er heimilað P/F Suðuroyartunlinum at áseta gjald fyri at koyra ígjøgnum tunnilin og at áseta støddina á gjaldinum.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Eftir § 1 áliggur tað P/F Suðuroyartunlinum at verða ábyrgdarhavandi byggiharri fyri Suðuroyartunnilin við tilhoyrandi tunnils- og vegakervum.

Eftir § 5 áleggur lógaruppskotið P/F Suðuroyartunlinum at avhenda alt tunnils- og vegakervið, uttan sjálvan Suðuroyartunnilin, til landið fyri útveganarkostnað, tá ið verkætlanin er liðug.

Í § 8 stk. 4 er heimilað Umhvørvisstovuni at fáa endurrindað frá P/F Suðuroyartunlinum útreiðslur, sum stovnurin hevur av at viðgera mál um umhvørvismeting og umhvørvisgóðkenning.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Í lógaruppskotinum § 2, stk. 3 eru ávísar heimildir mótvegis partafelagnum lagdar til landsstýrisfólkið á økinum. Í § 7 er ein ognartøkuheimild givin til landsstýrisfólkið.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Í § 7 er ein ognartøkuheimild løgd til landsstýrisfólkið á økinum.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Uppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar. Men tá ið sjálvt íverksetingarlógaruppskotið verður lagt fram seinni, kann tað hava aðrar avleiðingar, sum verða lýstar í tí uppskotinum.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Ja | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

# Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

## 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**
Í hesi grein er ásett, at P/F Suðuroyartunnilin fer at standa fyri samlaðu verkætlanini, t.v.s. bæði undirsjóvartunli millum Djúpadal norðanfyri Skarvanes og Sandvík, og eisini tilhoyrandi tunnils- og vegakervum.

Tá hinir undirsjóvartunlarnir í Føroyum hava verið gjørdir, hevur mann í fleiri førum havt trupulleikar av, at endalig avgerð ikki hevur verið tikin um linjuføringar fyri tilhoyrandi vegir og tunlar. Í sambandi við Norðoyatunnilin gingu fleiri ár, áðrenn semja var um, hvar vegurin gjøgnum Leirvík skuldi ganga frá Norðoyatunlinum til Leirvíkstunnilin. Í sambandi við Eysturoyartunnilin var ósemja um, hvør skuldi rinda fyri innkoyringarveg til Havnar og fyri veg gjøgnum ella fram við Runavík. Ikki fyrr enn eftir at undirsjóvartunnilin var tikin í nýtslu, gjørdu landið og avvarðandi kommunur semju um, at landið rindaði ein part, og kommunurnar ein part av vegaføringini, sum leiddi ferðsluna frá undirsjóvartunlinum til kommunalar vegir, og framvegis eru allir hesir vegir ikki lidnir.

Politiska ynskið hevur verið, at talan skal vera um eina samlaða verkætlan, sum bæði fevnir um undirsjóvartunnil og tilhoyrandi tunnils- og vegakervi, fyri at tryggja, at øll vegastrekki eru við, at verkætlanirnar eru samskipaðar, og at verkætlanin verður framd á mest skynsama hátt búskaparliga.

At partafelagið stendur fyri samlaðu verkætlanini skal tryggja, at arbeiðið at gera undirsjóvartunnil verður samskipað við arbeiðið at gera tilhoyrandi vegir og tunlar, og soleiðis minka um vandan fyri, at til- og frákoyringarvegir ikki eru lidnir og klárir at taka í nýtslu í seinasta lagi, tá koyrandi verður gjøgnum undirsjóvartunnilin.

Higartil hevur eingin serlóggáva verið, sum skipar virksemið hjá felagnum ella ásetir, hvørjar heimildir felagið hevur í mun til Suðuroyartunnilsverkætlanina. P/F Suðuroyartunnilin varð stovnað við 4 mió. kr. í partapeningini, sum varð játtaður á løgtingsfíggjarlógini fyri 2022 við tí eina endamáli at gera undirsjóvartunnil millum Suðuroy og Sandoy. P/F Suðuroyartunnilin hevði stovnandi aðalfund, tann 8. novembur 2022, har viðtøkur felagsins vórðu samtyktar.

Sambært viðtøkunum er endamál felagsins at gera undirsjóvartunnil millum Sandoy og Suðuroy við tilhoyrandi vegagerð, at hava rakstur av tunlinum um hendi og at reka annað virksemi í hesum sambandi. Higartil hevur P/F Suðuroyartunnilin einans arbeitt við at fyrireika Suðuroyartunnilin sambært heimildini á fíggjarlógini.

**Til § 2**
Greinin inniheldur reglur um sjálvt partafelagið P/F Suðuroyartunnilin. Reglurnar eru rættiliga einsljóðandi reglunum, sum vóru fyri P/F Vágatunnilin, P/F Norðoyatunnilin og P/F Eystur- og Sandoyartunlar.

**Til § 2, stk. 1**
Staðfestir, at partapeningurin skal vera ogn landsins. Tí krevur tað serliga lógarheimild, um onnur skulu keypa partapeningin.

**Til § 2, stk. 2**
Við hesi áseting verður nágreinað, at tað heldur ikki á annan hátt enn við vanligari sølu er møguligt, at onnur enn landið kunnu gerast partaeigarar, t.d. við samanlegging v.m. kunnu blíva eigarar av partapeninginum í felagnum. Ásetingin í stk. 2 er hinvegin ikki til hindurs fyri, at felagið kann verða lagt saman við øðrum feløgum, sum landskassin einsamallur eigur.

**Til § 2, stk. 3**
Á stovnandi aðalfundi, tann 8. novembur 2022, har viðtøkur felagsins vórðu samtyktar, varð nevnd vald og ein stjóri varð settur. Stjórin hevur ábyrgd mótvegis nevnd felagsins fyri dagligu leiðsluni av felagnum.

Eftir greinini skulu starvsskipan, lønir til nevnd og stjóra og lánstreytir góðkennast av landsstýrisfólkinum á økinum.

**Til § 3**
Her er ásett, at P/F Suðuroyartunnil fær heimild til at fyrireika, prosjektera og bjóða út Suðuroyartunnil við tilhoyrandi tunnils- og vegakervum.

Heimild er ikki at taka av nøkrum tilboði eftir hesi grein.

Forkanningararbeiðið, sum Løgtingið við játtan á fíggjarlógunum fyri 2023 og 2024 hevur samtykt, at P/F Suðuroyartunnilin skuldi gera, er komið væl ávegis.

Givið er tó, at fyrireikingararbeiðið heldur fram, samstundis sum farið verður undir at detailprosjektera verkætlanina, so at verkætlanin kann bjóðast út. Harumframt eru eisini verkætlanir tiknar við í samlaðu verkætlanini, sum higartil ikki hava verið partur av arbeiðinum.

Tá ið verkætlanirnar eru liðugt fyrireikaðar og prosjekteraðar verður farið undir at bjóða verkætlanina út. Væntandi verða ymsir partar av verkætlanini bjóðaðir út í ymiskum tíðarskeiðum, stutt áðrenn teir skulu byggjast. Eitt nú verða el-arbeiði, ventilatión og pumpuskipanir væntandi ikki bjóðað út í fyrsta umfari. Men tá høvuðsarbeiðið, sjálvur undirsjóvartunnilin, og atknýttir tunlar og vegir, hava verið bjóðaðir út og tilboðini eru komin inn, er óvissan um kostnað nógv minni, enn hon er nú.

Ásett er eisini, at Suðuroyartunnilin við tilhoyrandi tunnils- og vegakervum fevnir um sjálvan undirsjóvartunnilin millum Sandvík og Djúpadal norðanfyri Skarvanes við atkomutunli til Skúvoyar og fylgjandi tunlar og vegir:

- Farleið frá verandi vegi í Traðardali eysturum Sandsvatn við vegi og møguligum tunli undir Traðarhamri til undirsjóvartunnilin í Djúpadali við íbinding til verandi veg til Skálavíkar og Skarvanes,
- Veg millum Suðuroyartunnilin og nýggja Sandvíkartunnilin við íbinding í verandi veg í Sandvík,

- Tunnil millum Sandvík og Hvalba (nýggjur Sandvíkartunnil), og
- Veg millum nýggja Sandvíkartunnilin og landsvegin frá Hvalbiartunlinum.

Íroknað eru eisini tunnilsmunnar og neyðugir arbeiðsvegir.

**Til § 3, stk. 1, nr. 1**
Ásetir, at farleiðin millum Sandoyartunnlin í Traðardali og Suðuroyartunnilin í Djúpadali gongur eysturum Sandsvatn, við vegi og møguliga tunli undir Traðarhamri, og at vegurin skal hava íbinding í verandi vegir til Skálavíkar og Skarvanes.

Ymiskar ætlanir hava verið umrøddar, og endaliga linjuføringin er ikki endaliga fastløgd enn, men verður fastløgd saman við Sands kommunu og Umhvørvisstovuni.

**Til § 3, stk. 1, nr. 2**
Ásett verður, at undirsjóvartunnilin úr Djúpadali, norðanfyri Skarvanes, til Sandvíkar við atkomutunli til Skúvoyar er partur av verkætlanini.

Undirsjóvartunnilin verður sambært forprosjektinum 22,8 km langur, og hevur 2 koyribreytir í sama bergholi.

Største hall er 5% og mesta dýpið er 180 m.

Í forprosjektinum er teknaður ein T9,5-tunnil, t.e. sum Sandoyartunnilin, men ynski er um at bjóða undirsjóvartunnilin út sum bæði T9,5- og T10,5-tunnil.

Atkomutunnil til Skúvoyar verður ætlandi 1,5 km langur, 8,5 metrar breiður og hallið uml. 10%. Í útboðstilfarinum verður latið upp fyri, at tunnilin til Skúvoyar kann vera somu støðd sum høvuðstunnilin, og tí verður kravið í minsta lagi 8,5 metrar breiður.

**Trygd**
Norconsult, sum hevur staðið fyri at gera forprosjekt, hevur eisini gjørt uppskot til, hvørji trygdarátøk skulu gerast. Fyrsta uppskotið er seinni tillagað, og trygdarrúm eru komin aftrat.

Trygdarátøk í vandastøðu fevna um kunningarskelti og kunning umvegis hátalarar, sum eru knýtt at sjálvvirkandi telduskipan.

Í sambandi við eld í tunlinum, er tað rætta at gera at koyra út. Tveir tunnilsmunnar eru, sum eru rýmingarleiðir, og koyrast skal burtur frá eldinum. Tunnilin verður gjørdur, so til ber at venda í tunlinum og koyra út.

Í undantaksstøðu kann verða brúk fyri trygdarrúmunum.

Luftskiftiskipanin er ein týðandi partur av tilbúgvingini, tá eldur kemur í ein bil í tunlinum, og onkur ikki kann koyra út sjálvur. Luftskiftiskipanin skal megna at blása roykin annan vegin, soleiðis at farast kann inn í tunnilin úr hinum munnanum eftir fólki sum skulu hjálpast út, og síðani skal luftskiftiskipanin blása øvugtan veg, so fólk hinumegin eldin kunnu hjálpast út.

Neyðugt verður helst at stýra ferðsluni í atkomutunlinum til Skúvoyar fyri at betra um trygdina umframt at forða fyri, at bygdin verður full av bilum og ferðafólki. Hetta kann gerast við at

avmarka tungari ferðslu til ávís tíðspunkt og annars at stýra vanligu ferðsluni, uttan at tað gongur út yvir møguleikan hjá fastbúgvandi fólki í Skúvoy at ferðast til og frá oynni.

Í sambandi við endaligu prosjekteringina og útbjóðingina av tunnilsverkætlanini verður arbeitt víðari við at greina váðar og møgulig trygdartiltøk, undir hesum eisini kostnaðin av at seta trygdartiltøkini í verk og ávirkan teirra á trygdina. Landsverk skal góðkenna verkætlanina, áðrenn verkætlanin verður boðin út.

**Jarðfrøði**
Gjørdar eru jarðfrøðiligar forkanningar sambært tilmæli frá Jarðfeingi av økinum, har Suðuroyartunnilin fer at verða bygdur.

Í høvuðsheitum hevur talan verið um:
- Skrásetingar á landi,
- Kjarnuboringar,
- Seismiskar kanningar av havbotninum, og
- Multibeam kanningar av havbotninum.

Ætlanin er, at Suðuroyartunnilin verður bygdur í stóran mun í miðfláunum (Malinstindur) og ein partur í ovastu fláunum (Enni). Hetta er jarðfrøði, sum góðar royndir eru við at byggja tunlar í. Vágatunnilin, Norðoyatunnilin og partvíst Eysturoyartunnilin vórðu bygdir í miðfláunum. Sandoyartunnilin og partvíst Eysturoyartunnilin vórðu bygdir í ovastu fláunum.

Higartil hevur ikki verið mett, at jarðfrøðin verður truplari, enn hon hevur verið við hinum undirsjóvartunlunum í Føroyum. Tunnilsfelagið og politiska skipanin hava fingið kunning um metingar av jarðfrøðini. Endaliga jarðfrøðiliga frágreiðingin varð liðug í november 2025 og liggur við sum fylgiskjal 38.

**Til § 3, stk. 1, nr. 3**
Ásett verður, at vegurin frá undirsjóvartunlinum í Sandvík og nýggja Sandvíkartunnilin er partur av verkætlanini. Vegaføringin í Sandvík er stýrd av tunnilsmunnunum til Suðuroyartunnilin og Sandvíkartunnilin, sum verða bundnir saman av vegnum. Ein íbinding

skal gerast til bygdarvegin í Sandvík. Talan verður um ein veg, sum verður gjørdur sambært reglum um H1 vegir.




**Til § 3, stk. 1, nr. 4**
Ásett verður, at nýggjur Sandvíkartunnil er partur av verkætlanini. Sandvíkartunnilin verður lagdur tvørtur gjøgnum Skálafjall. Sunnari tunnilsmunnin í Hvalba fer at liggja vestanfyri bygdina og verður bundin saman við ætlaða umfarsvegin í Hvalba.




Tunnilin millum Sandvík og Hvalba verður sambært forprosjektinum ætlandi ein T9,5, eins og Hvalbiartunnilin, Sandoyartunnilin og ætlaði Suðuroyartunnilin.

**Til § 3, stk. 1, nr. 5**
Ásett verður, at vegur í Hvalba frá Sandvíkartunlinum til landsvegin frá Hvalbiartunlinum er partur av verkætlanini. Vegurin í Hvalba er við í forprosjektinum og fer eftir ætlan at liggja rundanum verandi vegir í Hvalba. Ætlanin er at gera ein veg sambært reglum fyri H1 vegir við

80 km hámarksferð. Tá endaliga linjuføringin fyri vegin í Hvalba skal fastleggjast, skulu Hvalbiar kommuna og Umhvørvisstovan vera við í tilgongdini.




**Til § 3, stk. 2**
Greinin ger greitt, at lógarheimildin gevur bara heimild til at bjóða út, men ikki at taka av tilboðunum.

Tá tilboðini eru innkomin, og kostnaðurin fyri høvuðsarbeiðið, sjálvur undirsjóvartunnilin og atknýttir tunlar og vegir er kendur, verður politisk støða tikin til, um samlaða verkætlanin skal fremjast. Hetta verður gjørt við serstakari løgtingslóg, sum eisini fer at fevna um útrokningar fyri, hvussu nógvan pening neyðugt er at seta av á fíggjarlógini tey komandi árini fyri, at alt skal hanga saman fíggjarliga. Eisini verður ásett í serstøku løgtingslógini, hvørjar peningaupphæddir landskassin skal læna P/F Suðuroyartunlinum.

**Til § 4**
Ásett verður, at verkætlanin skal góðkennast av Landsverki, áðrenn verkætlanin verður bjóðað út, og tá arbeiðið er liðugt. Orðingin, at Landsverk skal góðkenna undir ábyrgd mótvegis landsstýrisfólkinum broytir ikki, at Landsverk virkar undir tí landsstýrisfólki, sum sambært tí til eina og hvørja tíð galdandi fráboðan um málsøkjabýti millum landsstýriskvinnur og landsstýrismenn, hevur heimildir mótvegis Landsverki.

Hetta var eisini galdandi, tá Eysturoyar- og Sandoyartunlarnir vórðu gjørdir.

Inniverandi lógaruppskot er ein heimild til at fyrireika, prosjektera og bjóða út verkætlanina og ikki at fremja verkætlanina.

Tí verður ásetingin um, at verkætlanin skal góðkennast, tá arbeiðið er liðugt, ikki viðkomandi, fyrr enn Løgtingið við serstakari løgtingslóg samtykkir tað.

Fyri at tryggja vegateknisku fakligu dygdina, trygdina og samskipanina við landsvegakervi annars, skal verkætlanin góðkennast av Landsverki.

Ferðslufaklig viðurskifti eru ábyrgdarøki hjá løgregluni.

Uppgávan hjá Landsverki er at góðkenna verkætlanina, áðrenn farið verður víðari til sjálva prosjekteringina av verkætlanini, og uppgávan hjá Landsverki er eisini at hava eftirlit við, at

prosjekteraða verkætlanin er í samsvari við ta góðkenning, sum fyriliggur, áðrenn verkætlanin verður bjóðað út.

Myndugleikabýtið áleggur eisini P/F Suðuroyartunlinum eina skyldu til leypandi at tryggja, at møguligar broytingar, sum verða gjørdar í verkætlanini undir fyrireiking og prosjektering, verða góðkendar av Landsverki, áðrenn verkætlanin verður bjóðað út.

Landsverk skal eftir hvørt stig í prosjekteringunum hava tilfarið frá P/F Suðuroyartunlinum til viðmerkingar og skal harafturat vegna landsstýrisfólkið góðkenna endaligu prosjektini.

At velja trygdarstig verður úrslit av eini tilgongd, sum er í gongd og heldur fram saman við prosjekteringini. Til ber ikki at brúka útlendskar trygdarásetingar beinleiðis, tí eingin standardur finst fyri undirsjóvartunlar, sum eru so langir sum Suðuroyartunnilin, og sum hava so lítið av ferðslu, sum væntandi verður í Suðuroyartunlinum.

Í víðari tilgongdini verða tí gjørdar fleiri váðametingar og kostnaðarmetingar fyri at áseta, hvørji trygdarátøk skulu vera partur av verkætlanini.

Ætlanin hevur verið og er framvegis, at Landsverk skal gera uppskot til góðkenningartilgongd og standardar, sum taka hædd fyri, at talan er um ein undirsjóvartunnil, sum er langur og hevur lága ferðslu. Landsverk hevur boðað frá, at stovnurin í løtuni fyrireikar eina frágreiðing um góðkenningartilgongdina av Suðuroyartunlinum og verður henda latin avvarðandi pørtum í næstum.

Tryggjast skal m.a., at teir normar og standardar, sum Landsverk brúkar og eru galdandi á økinum, tá henda lóg er samtykt í Løgtinginum, verða hildnir. Tá trygd og annað loyvir tí, kann Landsverk geva frávik frá hesum normum og standardum, fyri at tryggja, at verkætlanin kann gjøgnumførast sum ætlað.

Um Løgtingið við serstakari lóg samtykkir at fara undir at fremja verkætlanirnar, skal Landsverk hava eftirlit við, at verkætlanirnar verða framdar sambært samsvarandi góðkendu prosjektum.

**Til § 5, stk. 1**
Tá ið tilhoyrandi vegir og tunlar uttanfyri sjálvan undirsjóvartunnilin eru lidnir, verða teir avhendaðir landinum fyri útveganarkostnað, og gerast partur av vanliga landsvegakervinum, og fyri teir tunlarnar og vegirnar, verður løgtingslógin um landsvegir beinleiðis galdandi frá tá av.

Í byggitíðini letur landið P/F Suðuroyartunlinum lán til verkætlanina, og tá partafelagið avhendar vegir og tunlar til landið fyri upphædd, sum svarar til útveganarkostnað, verður lánitørvurin tilsvarandi minni.

**Til § 5, stk. 2**
Meðan byggiarbeiðið fer fram, verða umframt rentuútreiðslur eisini aðrar munandi útreiðslur, so sum forkanningar v.m., sum ikki kunnu dragast frá, tí tað verða ongar rakstrarinntøkur í byggitíðini. Eftir galdandi skattalóg er heimild til at draga frá skattligt hall í skattligu inntøkuni tey fylgjandi 5 árini.

Í hesum skeiði kann frádrátturin tó bert flytast til eitt seinni inntøkuár, rúmast tað ikki í skattskyldugu inntøkuni undanfarna ár. Fyri at eingin ivi skal vera um, hvussu ein tunnils- og vegagerð í avskrivingarligum høpi er at meta eftir galdandi skattalóg, verður skotið upp, at reglurnar um vinnuligar bygningar verða nýttar, soleiðis sum tað eisini varð gjørt í sambandi við P/F Norðoyatunnilin og P/F Eystur- og Sandoyartunlar. Mest nærliggjandi er at sammeta tunnilin við vinnuligan bygning, og tí er hetta skilað til í lógini.

**Til § 6**
Undirsjóvartunnilin er ogn hjá partafelagnum, og partafelagið rekur og viðlíkaheldur tunnilin. Felagið hevur rætt til at krevja gjald fyri at koyra ígjøgnum tunnilin, og tað er felagið, sum ásetur, hvat gjaldið skal verða fyri at koyra ígjøgnum tunnilin.

Tunnilin er ikki ein partur av vanliga landsvegakervinum, men regluverkið kring tunnilin er tað sama fyri Suðuroyartunnilin, sum fyri landsvegir annars, tó so at heimildirnar eru hjá partafelagnum og ikki hjá Landsverki, uttan í teimum førum, har lógin greitt sigur, at Landsverk hevur heimildirnar.

Leisturin er hin sami fyri Suðuroyartunnilin, sum fyri hinar undirsjóvartunlarnar í landinum.

Mett verður, at ferðslan í Suðuroyartunlinum í fyrstuni verður 1.400 akfør tilsamans um samdøgrið (báðar vegir, svarandi til uml. 700 bilar hvønn vegin). Til samanberingar kann vísast á, at gerandisferðslan í august 2024, sambært ferðsluteljingum hjá LV á hesum vegastrekkjum, vóru:

- Hovstunnilin: 1.648 akfør
- Vestmannavegurin: 1.390 akfør
- Skálavegurin: 1.383 akfør
- Norðanfyri Kollafjørð: 2.878 akfør
- Glyvravegur: 7.395 akfør

Eisini kann vísast á, at í seinasta 12-mánaða tíðarskeiði, sum er uppgjørt, t.e. desember 2024 – november 2025, koyrdu 1.065 akfør í miðal um samdøgrið í Sandoyartunlinum (báðar vegir).

**Til § 6, stk. 2**
Ásetir, at P/F Suðuroyartunnil uttan kostnað hevur rætt til at fáa upplýsingar frá bilaskránni um eigarar/brúkarar við tí endamáli at kunna krevja og ansa eftir, at hesir gjalda fyri at brúka tunnilin.

Greinin er einsljóðandi § 12 í løgtingslóg um at stovna partafelagið og byggja og reka undirsjóvartunlar millum Streymoy og Eysturoy og millum Streymoy og Sandoy.

**Til § 6, stk. 3**
Ásetingin nágreinar, at skipan av ferðsluni fer fram eftir somu reglum og leiðreglum sum fyri landsvegir.

Greinin er einsljóðandi § 10, stk. 3 í løgtingslóg um at stovna partafelagið og byggja og reka undirsjóvartunlar millum Streymoy og Eysturoy og millum Streymoy og Sandoy.

**Til § 6, stk. 4**
Staðfest verður, at tunlarnir eru ikki partur av landsvegakervinum. Hetta merkir, at tað er tunnilseigarin, og ikki Landsverk, sum er vegamyndugleiki við teimum fíggjarligu og øðrum skyldum, sum áliggja einum vegamyndugleika. Talan er um somu skyldur, sum vanliga eru álagdar vegamyndugleikanum.

Greinin er einsljóðandi § 10, stk. 1 í løgtingslóg um at stovna partafelagið og byggja og reka undirsjóvartunlar millum Streymoy og Eysturoy og millum Streymoy og Sandoy.

**Til § 6, stk. 5**
Landsverk hevur gjøgnum árini upparbeitt ymiskar siðvenjur um, hvørji loyvi krevjast í sambandi við landsvegagerð. Við hesi áseting fær P/F Suðuroyartunnil júst somu heimildir, sum Landsverk hevur upparbeitt gjøgnum árini.

**Til § 6, stk. 6**
Ásetir, at P/F Suðuroyartunnil kann ikki verða kravt gjald fyri íbinding til landsvegir.

Greinin er einsljóðandi § 10, stk. 4 í løgtingslóg um at stovna partafelagið og byggja og reka undirsjóvartunlar millum Streymoy og Eysturoy og millum Streymoy og Sandoy.

**Til § 6, stk. 7**
Ásetir, at tað er skyldan hjá P/F Suðuroyartunlinum at rinda fyri tær íbindingar, sum verða gjørdar til verandi landsvegir.

Um eitt íbindingarverklag trívur inn í ein verandi landsveg, skal íbindingarverklagið, tá arbeiðið er liðugt, verða partur av tí samanhangandi landsvegakervi, sum landsstýrið eigur.

Ásett verður eisini, at tað er skyldan hjá felagnum at gera og rinda fyri útreiðslur í sambandi við møguliga umskipan av landsvegum.

Hetta merkir eisini, at felagið fyri egna rokning, skal fáa í lag, at møgulig óbrúkt vegastrekkir verða frágingin soleiðis, at tey ikki misprýða náttúruna.

Greinin er einsljóðandi § 10, stk. 5 í løgtingslóg um at stovna partafelagið og byggja og reka undirsjóvartunlar millum Streymoy og Eysturoy og millum Streymoy og Sandoy.

**Til § 7, stk. 1**
Eins og gjørt varð, tá ið Vágatunnilin, Norðoyatunnilin, Eysturoyartunnilin og Sandoyartunnilin vórðu gjørdir, so er í lógargrundarlagnum undir tunnilsbyggingini løgd ein heimild til landsstýrið at ognartaka neyðugt lendi, sum verður brúkt í sambandi við tunnilsgerðina.

Til sjálvan undirsjóvartunnilin er ognartøka ikki fyri neyðini. Men til sjálvar munnarnar og vegirnar til munnarnar er tørvur á ognartøkumøguleika, um semja ikki fæst við ánararnar um at avhenda lendið. Tá ið tað snýr seg um Suðuroyartunnilin er ognartøkuheimildin meira viðkomandi, tí at prosjektið eisini fevnir um vegir og tunlar, ið eru knýttar at, og tí fevnir um fleiri ognir, sum eru á privatum hondum.

Ognartøkuheimildin fevnir eisini um at ognartaka lendi til ymisk arbeiðsøki, sum tørvur er á uttan fyri tunnilin, og eisini til økið, sum skal nýtast til at tyrva tunnilsgrótið á.

Ognartøkuheimildin tekur við, longu tá ið § 7 hevur fingið gildi, hóast serstøk løgtingslóg ikki er gjørd sbr. § 3, stk. 2 at taka av tilboðum at gera Suðuroyartunnilin.

Hetta tí, at neyðugt er, at ognartøkur eru komnar uppá pláss, áðrenn farið verður undir arbeiðið.

Ásett er, at tingast má fyrst við ánararnar um eina semjuloysn, áðrenn farið verður til ognartøkumøguleikan.

**Til § 7, stk. 2**
So sum stjórnarrættarliga er ásett so verður her endurtikið, at ognartøkan verður gjørd móti fullum endurgjaldi.

**Til § 7, stk. 3**
Fyrsta ognartøkuheimildarlógin í Føroyum var Lov nr. 69 af 7. maj 1881 om Forpligtelse til Jords Afgivelse til offentlige Veje, Havne og Landingssteder, samt til offentlige Skoler på Færøerne sum enn er galdandi. Í seinni ognartøkulógum hevur altíð verið víst til ognartøkumannagongdina í hesi lógini, og tað verður eisini gjørt í hesum føri.

**Til § 7, stk. 4**
Greinin fer neyvan at verða brúkt til annað enn sjálvar munnarnar til undirsjóvartunnilin. Fyri annað ognartikið øki, serliga allar vegirnar sum gjørdir verða, er greinin ikki relevant.

§ 5, stk. 1 sigur nevniliga, at hesir vegir gerast landsvegir, so skjótt teir eru lidnir og skulu takast í nýtslu.

**Til § 8, stk. 1**
Ásetir, at tað er skyldan hjá P/F Suðuroyartunlinum at gera eina frágreiðing, sum lýsir avleiðingar av samlaðu verkætlanini á náttúru og umhvørvið.

Krav um umhvørvisárinsmeting er ikki ásett í føroyskari lóggávu, men í samráð við Umhvørvismálaráðið og Umhvørvisstovuna, skal frágreiðingin fevna um:

Lýsing av náttúru og umhvørvi á staðnum og tí ávirkan, sum ætlanin kann hava á eitt nú fólk og bústaðarøki (frástøða, spillvatn, óljóð, ristingar v.m.); gróður og djóralív á landi, í vatni, í luftini; jørð, vatn, og luft og veðurlagsskipanina; rekreativ virði, landsløg o.a.

Eisini skal frágreiðingin lýsa, hvørji tiltøk verða sett í verk fyri at avmarka møguliga ávirkan á omanfyrinevndu viðurskifti.

P/F Suðuroyartunnil hevur skyldu til at gera frágreiðingina og fer í hesum sambandi at fáa fakfólk við serkunnleika til ymisku tættirnar at standa fyri kanningararbeiðinum.

Umhvørvisstovan hevur víst á, at tað er ynskiligt, at P/F Suðuroyartunnil ger eina arbeiðsskrá í samráð við Umhvørvisstovuna.

Arbeiðsskráin skal m.a. vísa, hvussu umhvørvisárinsmetingin verður skipað, og skal lýsa nær og av hvørjum metingin verður gjørd, og hvørjar kanningar fara at verða gjørdar.

Endamálið er at tryggja, at umhvørvisárinsmetingin fer at fevna um viðkomandi viðurskifti og neyðugar kanningar verða gjørdar.

P/F Suðuroyartunnil syrgir fyri, at neyðugar kanningar verða gjørdar og ger uppskot til umhvørvisárinsmeting, sum verður latin Umhvørvisstovuni til viðmerkingar.

Umhvørvisárinsmetingin verður síðani send í almenna hoyring, áðrenn endaliga frágreiðingin verður latin Umhvørvisstovuni til góðkenningar.

**Til § 8, stk. 2**
Ásett er, at Umhvørvisárinsmetingin skal í almenna hoyring í 6 vikur hjá almenningi og viðkomandi pørtum. Síðani skal frágreiðingin endaliga góðkennast av Umhvørvisstovuni.

**Til § 8, stk. 3**
Ásett er, at tey, sum eru partur av málinum, kunnu kæra góðkenningina av frágreiðingini við 4 vikur freist til landsstýrisfólkið við umhvørvismálum.

**Til § 8, stk. 4**
Ásetingin heimilar Umhvørvisstovuni at taka gjald fyri málsviðgerð í samband við góðkenning av umhvørvisárinsmetingini sbrt. § 8 stk. 1 og og umhvørvisgóðkenningini í § 8, stk. 5 í lógaruppskotinum.

Tá Umhvørvisstovan letur góðkenning til almennar og privatar stovnar, undir hesum eisini kommunur sambært umhvørvisverndarlógini, verður hetta gjørt mótvegis gjaldi. Talan verður um somu skipan.

**Til § 8, stk. 5**
Ásett verður eisini, at undirsjóvartunnilin skal hava umhvørvisgóðkenning sambært § 28 stk.1 í Umhvørvisverndarlógini, áðrenn hon verður framd, og verður frágreiðingin, sum er lýst omanfyri, partur av góðkenningartilgongdini.

Endamálið við umhvørvisgóðkenningini er at fyribyrgja og avmarka dálking av náttúru og umhvørvi og at fyribyrgja og avmarka ampar, sum kunnu standast av virkseminum. Ein umhvørvisgóðkenning setur treytir til eitt nú óljóð, lukt, ristingar, spillvatn v.m.

**Til § 9**
Ásett verður, at P/F Suðuroyartunnilin verður fevndur av innlitslógini.

Undir viðgerðini av málinum í undanfarnu tingsetu, hevur løgmaður víst á, at tað í innlitslógini § 1, stk. 3 er ásett, at landsstýrið kann áseta reglur um, at lógin skal verða galdandi fyri nærri ásett feløg (umseting av orðingini “selskaber” í donsku lógini), stovnar, felagsskapir v.m., sum ikki kunnu roknast til ta almennu fyrisitingina í tann mun, at útreiðslurnar av teirra virksemi í høvuðsheitunum verða rindaðar av landinum.

Tí varð ikki mett, at tørvur var á at áseta innlitsreglur í heimildarlógini fyri útbjóðing av Suðuroyartunlinum tá tað í kunngerð kann ásetast, at innlitslógin eisini skal galda fyri P/F Suðuroyartunnilin.

Løgmálaráðið hevur í telduposti til Løgmansskrivstovuna 8. mai 2025 gjørt vart við, at tey hava umhugsað innlitsspurningin og eru komin til ta niðurstøðu, at tey halda, at við tí virksemi, sum P/F Suðuroyartunnilin hevur, er tað ikki heimild hjá landsstýrinum at áseta, at løgtingslógin um innlit í fyrisitingina skal galda fyri P/F Suðuroyartunnilin.

Løgmaður metir, at tað er umráðandi í eini so stórari almennari verkætlan, at almenningurin fær innlit í, hvat P/F Suðuroyartunnilin tekst við.

Vísandi hertil verður tað, fyri at beina allan iva burtur, skotið upp at seta inn serreglu í lógaruppskotið um, at P/F Suðuroyartunnilin er fevndur av innlitslógini.

**Til § 10**
Staðfestir gildiskomuna.

**Til § 10 stk. 2**
Ásetir skiftisreglu soleiðis, at innlitsreglur bara er galdandi fyri skjøl, sum P/F Suðuroyartunnilin hevur gjørt, ella sum eru komin teimum í hendi, eftir at løgtingslógin fekk gildi soleiðis, at ikki verður lóggivið afturvirkandi mótvegis P/F Suðuroyartunlinum.

Løgmansskrivstovan, 11. desember 2025

**Aksel V. Johannesen**
løgmaður

/ John Rajani

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**

| | |
|---|---|
| Fylgiskjal 1: | Forprosjekt Suðuroyartunnilin, Norconsult 12.05.2023 |
| Fylgiskjal 2: | Forprosjekt Suðuroyarleiðin – vegagerð, LBF 24.11.2023 |
| Fylgiskjal 3: | Risiko knyttet til brann ved ulike konsepter for Suðurøtunnelen, Rapport frá SWECO 19.04.2022 |
| Fylgiskjal 4: | Brannrisiko under bygging af tunneler, SWECO 06.05.2022 |
| Fylgiskjal 5: | Risikovurdering av aspekter knyttet til byggeperioden, Notat frá SINTEF 10.11.2023 |
| Fylgiskjal 6: | Risikovurdering, Forprosjekt Suðuroyartunnilin, Norconsult 24.11.2023 |
| Fylgiskjal 7: | Risikovurdering av langsgående ventilasjon i Sudurøtunnelen, SWECO 15.03.2024 |
| Fylgiskjal 8: | Peer Review and Second Opinion of Risk Analyses for Suðuroyartunnlin, HOJ Consulting GmbH 11.10.2024 |
| Fylgiskjal 9: | Evakueringsrom – Utforming og kostnader, Notat fra Norconsult 21.05.2024 |
| Fylgiskjal 10: | Fíggingarleistur, Løgmansskrivstovan oktobur 2024 |
| Fylgiskjal 11: | Fyrivarni Landsbankans til samanbering av kostnaði av suðuroyarsigling og suðuroyartunli oktobur 2024 |
| Fylgiskjal 12: | Kost-nyttu greining, Landsverk oktobur 2024 |
| Fylgiskjal 13: | Forkanning av einari nýggjari suðuroyarleið, Landsverk 2021 |
| Fylgiskjal 14: | Álit um møguleikar, fyrimunir og vansar, at gera ein Suðuroyartunnil, Samferðslumálaráðið 2019 |
| Fylgiskjal 15: | Viðmerkingar til kostnaðarmeting av Suðuroyartunlinum, Landsverk 04.07.2024 |
| Fylgiskjal 16: | COWI Ísland 3. partsmeting av linjuføringini |
| Fylgiskjal 17: | Viðmerkingar frá HOJ Consulting til viðmerkingar frá Landsverki, umframt lívsrensl hjá Niels Peter Høj |
| Fylgiskjal 18: | Notat om geologiske forskjeller mellom ulika traseer for Suduroytunnelen, SINTEF 08.01.2025 |
| Fylgiskjal 19: | Semjuskjal 8. november 2024 |
| Fylgiskjal 20: | Supplerende risikovurdering Suðuroyartunnilin, Vurdering av løsning for tilfluktsrom, Notat frá Norconsult 2025-02-12 |
| Fylgiskjal 21: | Notat frá P/F Suðuroyartunnilin um at bora úr Skúvoy, 07-05-2025 |
| Fylgiskjal 22: | Arbeiðssetningur til serfrøðingabólk, mai 2025 |
| Fylgiskjal 23: | Viðmerkingar frá Umhvørvisstovuni, 13. mai 2025 |
| Fylgiskjal 24: | Niðurstøða hjá serfrøðingabólki, 2025.05.15 |
| Fylgiskjal 25: | Fundarniðurstøða um Suðuroyartunnilin, 10. juni 2025 |
| Fylgiskjal 26: | Kunning um linjuføringar av Suðuroyartunlinum (framløga fyri tingfólki), P/F Suðuroyartunnilin, 20. oktober 2025 |
| Fylgiskjal 27: | Linjeføringer – beslutningsnotat, version 01, 20.10.2025 |
| Fylgiskjal 28: | Alternative traseer for Suðuroyartunnilin (Bilag 1 til beslutningsnotat), Norconsult, revision 1, 30.09.2025 |
| Fylgiskjal 29: | Kostnaðarmeting (Bilag 2 til beslutningsnotat), LBF 2025 |
| Fylgiskjal 30: | Notat om geologiske forskjeller mellom ulika traseer fo Sudurøytunnelen, (Bilag 3 til beslutningsnotat), Sintef, versjon 3, 25-09-2025 |
| Fylgiskjal 31: | Risikovurdering av aspekter knyttet til byggeperioden m/ fokus på tunneldrivingen (Bilag 4 til beslutningsnotat), Sintef, versjon 03, 26-09-2025 |

| | |
|---|---|
| Fylgiskjal 32: | Uavhengig gjennomgang av beslutningsnotat (Bilag 5 til beslutningsnotat), Kasper Nordmelan 11. oktober 2025 |
| Fylgiskjal 33: | Suðuroy tunnel – cost estimation of different alignments. 3rd part review (Bilag 6 til beslutningsnotat), Cowi, 20. October 2025 |
| Fylgiskjal 34: | Yvirlit yvir viðmerkingar frá 3. pørtum og ávirkan á avgerðarnotat, P/F Suðuroyartunnilin 25-10-2025 |
| Fylgiskjal 35: | Kostnað-nyttu greining av Suðuroyartunlinum (framløga fyri tingfólki), Brandur Sjúrðarson, Landsverk, Tinganes 20. oktobur 2025 |
| Fylgiskjal 36: | Kostnað-nyttu greining av Suðuroyartunlinum við fýra møguleikum, Landsverk oktobur 2025 |
| Fylgiskjal 37: | Ískoyti til "Fíggingarleistur – Suðuroyartunnilin oktobur 2024", Løgmansskrivstovan desembur 2025 |
| Fylgiskjal 38: | Geological description of the Suðuroy tunnel area, Jarðfeingi 2025 |
| Fylgiskjal 39: | Hoyringarskriv frá Grímsfjalli |
| Fylgiskjal 40: | Hoyringarskriv frá Húsavíkar kommunu |
| Fylgiskjal 41: | Hoyringarskriv frá Tvøroyrar kommunu |
| Fylgiskjal 42: | Hoyringarskriv frá Hagafelag Føroya |
| Fylgiskjal 43: | Hoyringarskriv frá Uffe Bærentsen |
| Fylgiskjal 44: | Hoyringarskriv frá Skúvoyar kommunu |
| Fylgiskjal 45: | Hoyringarskriv frá Sandoyar Tjóðveldisfelag, Sandoyar Fólkafloksfelag og Sandoyar Sambandsfelag |
| Fylgiskjal 46: | Hoyringarskriv frá Búnaðarstovuni |
| Fylgiskjal 47: | Hoyringarskriv frá Jóannesi í Dali og framløga hann hevði í Løgmansskrivstovuni 27. august 2025 |
| Fylgiskjal 48: | Hoyringarskriv frá Barbaru Vang av Skarði |
| Fylgiskjal 49: | Hoyringarskriv frá Føroya Fuglafrøðifelag |
| Fylgiskjal 50: | Hoyringarskriv frá Tunnilsáhugabólkinum við Jóni Sigurdsson, Kristiani Stórhamar, Mouritsi Joensen |
| Fylgiskjal 51: | Hoyringarskriv frá Hvalbiar Kommunu |
| Fylgiskjal 52: | Hoyringarskriv frá Føroya Sílaveiðufelag |
| Fylgiskjal 53: | Hoyringarskriv frá Landsbankanum |
| Fylgiskjal 54: | Hoyringarskriv frá P/F Suðuroyartunlinum |
| Fylgiskjal 55: | Hoyringarskriv frá Føroya Arbeiðsgevarafelag |
| Fylgiskjal 56: | Hoyringarskriv frá Landsverk |
| Fylgiskjal 57: | Hoyringarskriv frá FNU |
| Fylgiskjal 58: | Hoyringarskriv frá Náttúrufelagsskapum: Føroya Náttúru- og Umhvørvisfelag, Hagafelagið, Føroya Sílaveiðifelag, Veltan og Føroya Fuglafrøðifelag |
| Fylgiskjal 59: | Hoyringarskriv frá Fíggjarmálaráðnum |
| Fylgiskjal 60: | Hoyringarskriv frá Hagastýrinum fyri Prestfjall, sunnari partur |
| Fylgiskjal 61: | Hoyringarskriv frá Umhvørvisstovuni |
| Fylgiskjal 62: | Hoyringarskriv frá Helga Nielsen |
| Fylgiskjal 63: | Hoyringarskriv frá borgarstjórunum í Hovs, Porkeris, Vágs og Sumbiar kommunum |
| Fylgiskjal 64: | Hoyringarskriv frá Óla Lassen |
| Fylgiskjal 65: | Hoyringarskriv frá Sands kommunu |
| Fylgiskjal 66: | Ummælisskriv við ummælisskrivi frá løgtingsmáli 72/2024 viðfest |